# Miðnámsrit

7 september 2015

## Um blaðið

Góðu lesarar!

Í  sjeynda Miðnámsriti eru viðtal við formenn í trimum fakfeløgum hjá lærarum. Vit spyrja teir um útbúgvingarpolitikk, brúgvagerð ímillum útbúgvingar, samstarv og annað.

Í november í fjør skipaði Føroya Studentaskúli og HF-skeið fyri temadegi um eftirmeting. Kirsten Brix helt eitt upplegg henda dagin, og hevur hon skrivað grein um tað, ið hon nevnir *Kvalitativ eftirmeting,* har hon deilir vitan, royndir og praksis við aðrar lærarar.

Frá Kristin Lange hava vit fingið grein, sum eitur *Meditatión á tímatalvuni*. Hon greiðir frá royndum við meditatión í undirvísingini. Sambært útsagnum frá næmingum hevur meditatión góða ávirkan á læringina.

Miðnámsskúlin á Kambsdali er farin undir serbreyt. Óli Wolles hevur skrivað um breytina og spyr, um fólk við menningartarni nú eisini skulu ganga í miðnámsskúla. Hann svarar við grundgevingum, har hann millum annað vísir á ST-samtyktir um mannarættindi.

Rógvi Thomsen hevur grein, sum hann nevnir *Undirvísing ella læring? Læring hjá teimum ungu í tí seinmodernaða samfelagnum*. Greinin lýsir undirvísing, læring og menning av identiteti hjá teimum ungu á føroyskum á miðnámi, serliga tí gymnasiala.

At enda hevur Olav grein í røðini um búskaparliga hugsan, hesaferð um Hermann Gossen, ið var ein av minni kendu undangongumonnunum innan marginalismuna í 19. øld.

*Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson*

# Innihaldsyvirlit

**Viðtal við Herálv Jacobsen, Tórður Johannesarson** 3

**Viðtal við Jørgin Vágslíð, Tórður Johannesarson** 6

**Viðtal við Kára Jespersen, Tórður Johannesarson** 9

**Kvalitativ eftirmeting, Kirsten Brix** 12

**Meditatión á tímatalvuni, Kristin Lange** 14

**Serbreyt á miðnámi – mennandi møguleikar, Óli Wolles** 18

**Undirvísing ella læring? Læring hjá teimum ungu í tí seinmodernaða samfelagnum, Rógvi Thomsen** 24

**Hermann H. Gossen – og brúkaraatferð, Olav Absalonsen** 44

# Viðtal við Herálv Jacobsen

Tórður Johannesarson

### *1. Hvussu heldur tú, at politiska skipanin arbeiðir útbúgvingarpolitiskt? Her verður m.a. hugsað um langtíðarætlanir og tá ið bygnaðarbroytingar skulu gerast?*

Tað er ringt at fáa eyga á ein yvirskipaðan útbúgvingarpolitikk. Á fólkaskúlaøkinum er tað so, at man roynir at fylgja við rákinum rundan um okkum, men grundgevingarnar fyri, hví vit gera sum vit gera, mangla. Tað verða í hvussu er ikki sett orð á tær. Nýggja próvtalsstigan tóku vit í brúk, so vit kunnu luttaka í útbúgving í altjóða høpi, og í tí sambandi skuldu vit hava og fingu málstýrdar námsætlanir. Neyðturviliga er einki galið í tí, men tað tykist sum um, at óttin fyri at gerast eftirbátar, er drívmegin, heldur enn skúlahugsanir ella útbúgvingarpolitikkur. Fólkaskúlin er seinnu árini so niðurpíndur fíggjarliga, at avbjóðingin er at fáa endarnar at røkka saman. Undir slíkum umstøðum er skjótt, at alt skúlaorðaskiftið tykist innantómt.

### *2. Hvat er passaligt næmingatal í flokkum?*

Í fólkaskúlalógini er ásett, at næmingatalið í flokkinum ”helst ikki” skal fara upp um 24 næmingar við skúlaársbyrjan. Tað átti at verið broytt soleiðis, at hámarkið fyri næmingatalið í flokkinum var 24 næmingar. Til vanliga floksundirvísing og undir vanligum umstøðum eru 24 næmingar í flokkinum eitt hóskandi tal. Tað eiga tó at verða námsfrøðilig atlit, sum avgera næmingatalið í flokkinum. Passaligt næmingatal í flokkum er í stóran mun tengt at næmingasamanseting, lærugrein og frálæruhátti. Er stórur munur á menningarstøðinum hjá næmingunum, ella eru fleiri næmingar, ið hava tørv á eyka stuðli, so eru 15 næmingar í flokkinum eitt passaligt tal. Er talan um verkligan frálæruhátt ella handaligar lærugreinar, so er somuleiðis best, um næmingatalið ikki fer upp um einar 15 næmingar. Tað eigur at vera rúm fyri at gera smærri bólkar ella at seta eyka lærarakreftir inn til ávís verkevni.

### *3. Hvussu heldur tú, at hugburðurin hjá myndugleikunum er viðvíkjandi námsfrøði?*

Tað er einki at ivast í, at avvarðandi myndugleikar gera sær tankar um, hvat neyðugt er í einum framkomnum skúla. Tað bera ískoytisútbúgvingarnar, sum seinnu árini eru settar í verk, prógv um. Ein støðugur trupulleiki er tó, at serútbúnu lærararnir ikki í nóg stóran

mun sleppa at virka á sínum øki. Fyrst og fremst tí játtanin til fólkaskúlan er tepur, men eisini tí at nógvir skúlar eru so smáir og starvsfólkahópurin so lítil, at fleiri serútbúgvingar ikki eru til staðar. Meira yvirskipað kann sigast, at vit hava flutt okkum frá tí gomlu skúlahugsanini um útbúgving sum virðismikla í sjálvum sær, til at hugsa um útbúgving sum førleikamenning til víðari útbúgving og kappingarføri. Fólkaskúlalærarar standa í spenningsgeilini millum báðar hugsanirnar. Og vit hava ikki sett orð á, hvat vit vilja.

### *4. Hvussu heldur tú, brúgvagerð millum grundnám, miðnám og hægri nám virkar í løtuni?*

Tað verður tosað um brúgvagerð, men óvist er, hvat mann ítøkiliga meinar við. Skúla-vegleiðararnir í fólkaskúlanum kunna um útbúgvingarmøguleikar og vitja á miðnáms-skúlum so frægt, sum umstøður eru til, og einstakir miðnámsskúlar vitja framhalds-deildirnar í skúlunum at greiða frá sínum virki og tilboðum. Hetta er sjálvandi at fegnast um. Men um talan er um brúgvagerð, veldst um, hvat vit leggja í orðið. Samskiftið millum fólkaskúla og miðnámsskúlar átti at verið munandi styrkt, so hvør visti av øðrum og um hvørjar avbjóðingarnar hvør í sínum lag hevði.

### *5. Hvussu sær tú tín leiklut sum fakfelagsformaður?*

Leikluturin sum fakfelagsformaður er í stóran mun myndaður av, at Lærarafelagið, eins og flestu fakfeløg í Føroyum, er eitt lítið felag, og tí er fíggjar- og arbeiðsorkan avmarkað. Tað, sum eg meti sum fremstu uppgávuna, er beinleiðis samskifti við limirnar, t.d. at limirnir kunnu venda sær til felagið við spurningum um arbeiðsviðurskifti og um viðurskifti av meira persónligum slagi. Tað er ein fyrimunur, at fjarstøðan millum einstaka limin og felagið er stutt, men hinvegin er tað arbeiðskrevjandi. Síðan kemur uppgávan at hava eyguni við, at avtalur og sáttmálar verða fylgd. Har er samskiftið við álitisfólkini í skúlunum kring landið av stórum týdningi. Í sambandi við avtalur og sáttmálar er sjálvsagt at samkifta við Mentamálaráðið, sum er evsti myndugleiki í fólkaskúlamálum og arbeiðsgevari hjá lærarum og skúlaleiðslum. Í sáttmála- og lønarspurningum er tað tó Fíggjarmálaráðið. Samanumtikið er arbeiðsøkið hjá formanninum sera umfatandi og fjølbroytt. Tað er einki at ivast í, at við eini størri umsiting hevði arbeiðið verið meira sundurlutað, men í eini lítlari umsiting mugu øll fáast við alt. Tann uppgávan, sum mangan liggur á láni, er at orða skúlapolitisku hugsanirnar hjá felagnum og í størri mun at luttaka í orðaskifti um fólkaskúlan.

### *6. Er samstarv millum YF Miðnám, Tekniska Lærarafelagið og Føroya Lærarafelag?*

Tað er eitt ávíst óformligt samband millum Lærarafelagið og YF. Hví samstarvið ikki er størri, er ikki gott at vita, men ein grund er allarhelst, at feløgini eru smá og arbeiðsorkan avmarkað. Tað hevði verið sera skilagott, um feløgini á útbúgvingarøkinum høvdu eitt felags forum, har man hittist, í byrjanini eina ella tvær ferðir um árið.

# Viðtal við Jørgin Vágslíð

Tórður Johannesarson

***1. Hvussu heldur tú, at politiska skipanin arbeiðir útbúgvingarpolitiskt? Her verður m.a. hugsað um langtíðarætlanir og tá ið bygnaðarbroytingar skulu gerast?***

Mín meining er, at tað ikki er nakar greiður útbúgvingarpolitikkur, og tá so okkurt einaferð kemur á dagsskrá, er tað fyri at spara nakrar krónur, og hetta endar sum oftast í einum "hurlivasa", - og einki er spart í síðsta enda.

Um man vil nakað skilagott politiskt, skal man seta fakfólk og tey sum arbeiða við útbúgvingunum saman at finna loysnir.

Tá tað kemur til lærlingaskipanina, hava vit upplivað, hvussu politiska skipanin og umsiting hennara arbeiðir. Fyri at spara, varð fyrst avgjørt at taka 4 tímar um vikuna av skúlatíðini frá lærlinginum; - tað eru 220 tímar í lærutíðini. Hetta helt politiska skipanin ikki fór at gera útbúgvingina verri, men royndirnar vísa tvørturímóti, at neyðugt hevur verið at skarva av serliga praktisku uppgávunum fyri at røkka ástøðiliga partin. Hetta var sera óheppið.

Seinni skuldu lærlingar við sáttmála, og næmingar uttan sáttmála samlesast (ganga í sama flokki). Úrslitið av hesum varð, at støðið á almennu lærugreinunum í Yrkisnámi bleiv niðurraðfest, frá C-støði niður á E-støði. Hetta hevur viðført, at teir sum ikki hava havt lærusáttmála, hava gingið eitt ár í skúla til fánýtis. Hetta tí eitt prógv við E-støði í sær sjálvum ikki gevur atgongd til nakað sum helst.

Tað, sum hevur eyðkent lærlingaskipanina, er, at hetta hevur verið ein skiftisskipan, har lærlingurin í fleiri umførum hevur gingið í skúla í eitt styttri tíðarskeið hvørja ferð. Hesa skipan avtók man við einum pennastroki, tá man avgjørdi, at lærlingurin skuldi taka meginpartin av skúlagongdini út í eitt. Við hesi avgerð tók man góða samspælið millum skúla og lærupláss av, nakað, sum annars var kjølfest í meistaralæruni. Hetta er ein gøla og stórt spell, og kemur at síggjast aftur handverksvinnuni um fá ár.

Man broytti skipanina fyri at spara, ikki fyri at betra útbúgvingina og ikki við næminginum í fokus, tíverri. Og tann stóri spurningurin er, hvussu nógv er spart í síðsta enda?

Nakað tað sama kann sigast um ta nýggju gymnasialu útbúgvingini, sum bleiv sett í verk fyri stuttum.

### *2. Hvat er passaligt næmingatal í flokkum?*

Viðvíkjandi yrkisnámi er tað ymiskt, hvat næmingatal kann vera í flokkunum, tí tað kann ofta vera treytað av amboðum og útbúnaði á skúlunum. Tí kunnu vit býta hetta sundur í tveir partar: ein ástøðiligan part og verkligan part.

Til ástøðiliga undirvísing er eitt tal uppá umleið 16 næmingar hóskandi, men til verkliga partin er talið 12 hóskandi.

Við nýggju skipanini eru flokkanir farnir at liggja um 14 til 18 næmingar, bæði til tann ástøðiliga og til tann verkliga partin.

Tað er ikki ásett nakrastaðni, hvussu nógvir næmingar kunnu vera í einum flokki á yrkisnámi. Tað eru amboð og útbúnaður, sum gera av, hvat ber til. Og tá útbúnaðurin bæði kostar nógv og krevur pláss, er torført at broyta nakað tí viðvíkjandi.

Tá tað kemur til tann gymnasiala partin, eru 20 til 24 næmingar passaligt.

### *3. Hvussu heldur tú, at hugburðurin hjá myndugleikanum er viðvíkjandi námsfrøði?*

Hugburðurin hjá myndugleikunum er á einum sera lágum støði, tá tað kemur til námsfrøðina. Tað sæst best við at hyggja at, hvussu nógvir lærarar mangla ta náms-frøðiligu útbúgvingina (NÚ). At ein lærari skal kunna undirvísa í 8 til 12 ár, áðrenn hann/hon kann fara undir námsfrøðiliga útbúgving, er heilt burtur við og undir alt lágmark, umframt at ástøðiligi parturin og yrkisligi parturin av útbúgvingini í flestu førum ikki fylgjast at, men at tað tvørturímóti kunnu ganga fleiri ár frá tí, ein tekur ástøðiliga partin, til ein sleppur at taka tann yrkisliga partin.

Hetta vísir bara, hvussu hugburðurin hjá myndugleikanum er hesum viðvíkjandi, og tað er total líkasæla.

### *4. Hvussu heldur tú, brúgvagerð millum grundnám, miðnám og hægri nám virkar í løtuni?*

Eg haldi ikki, hon virkar væl, tá eg skal meta um brúnna frá grundnám til miðnám (yrkisnám).

Hvør orsøkin er, veit eg ikki.  Tað kann vera, at vitanin um sjálva útbúgvingina, og hvørjar møguleikar hon gevur, er ov lítil. Tað kann eisini vera torført at broyta siðvenju millum tey ungu, har størsti parturin í nógv ár hevur valt tann “vanliga studentin” fram um tann “tekniska studentin” ella handverkslæruna.

Nógvir næmingar eru eisini illa fyri at ganga í skúla, og eru ikki búnir ella klárir til at fara undir víðari útbúgving, og so eru tað nøkur, sum bara ikki tíma ella duga væl at ganga í skúla.

### *5. Hvussu sær tú tín leiklut sum fakfelagsformaður?*

Sum formaður í einum lítlum felag er tín leiklutur mest umsitingarligur, sjálvandi at leiða felagið saman við nevndini til betri sáttmála og at hava eygu og oyru opin fyri broytingum, sum kunnu gera umstøðurnar verri hjá limum felagsins.

Dreymurin er, at tað einaferð fæst eitt samstarv ímillum fakfeløg, ella at feløg verða løgd saman, so at tað her í Føroyum bert vera 3 stór feløg, eitt fyri tey alment løntu, eitt fyri tey privatu og eitt fyri sjófólkið.

Tá kunnu fakfeløgini virkuliga gera mun og fáa nakað at siga politiskt. Tað verður so einki av tí so leingi, vit eru spjødd runt í fleiri smá feløg, tí tað er eisini ymiskt, hvussu feløg eru fyri viðvíkjandi fíggjarligu og umsitingarligu orkuni.

### *6. Er samstarv millum YF, Tekniska Lærarafelagið og Føroya Lærarafelag?*

Føroya Tekniska Lærarafelag (FTL) hevur ikki havt serliga nógv samstarv við hini feløgini. Hóast YF og FTL hava so at siga sama sáttmála, hevur einki samband verið millum hesi feløgini. Hví hetta er, veit eg ikki.

Møguliga hevur ein handverkari ikki sama status sum ein akademikari. Og tess vegna hevur verið ein gjógv millum feløgini, ein gjógv so breið, at tað ikki hevur lagt upp til samstarv við okkum.  At vit kanska meir eru at meta sum eitt handverkarafelag. Tað er tó ikki verri enn so, at okkurt felagsskriv til MMR er farið við postinum.

Millum FTL og FL havur als einki samstarv verið. Men tað er eisini tungt hjá einum lítlum felag at samstarva við eitt stórt felag, tí at eitt lítið felag sum FTL ikki hevur eina dagliga umsiting og tí ikki hevur somu orku, tá alt fakfelagsarbeiðið skal gerast í frítíðini.

# Viðtal við Kára Jespersen

Tórður Johannesarson

***1. Hvussu heldur tú, at politiska skipanin arbeiðir útbúgvingarpolitiskt? Her verður m.a. hugsað um langtíðarætlanir og tá ið bygnaðarbroytingar skulu gerast?***

Yvirskipað arbeiðir politiska skipanin í stórum eftir at reka miðnámsskúlan so bíliga sum gjørligt. Hetta hevur myndugleikin eisini ført fram opið í pressuni. Innihald og dygd í skúlanum tykjast at vera raðfest aftarlaga. Tá ið núverandi breytaskipanin varð samtykt eftir arbeiði og viðgerð í mong ár, hevði Yrkisfelagið Miðnám ongan leiklut havt í at fáa lógina gjørda. Felagið varð hildið uttanfyri ávirkan í hesi tilgongd. Fyri at fáa týðandi broytingar í skúlaskipanini at eydnast væl krevst, at avvarandi lærarar og teirra feløg verða tikin mest møguligt við í viðgerðina. Eisini var tað sera ørkymlandi undir seinastu sáttmálasamráðingum, ið vóru heilt serligar, av tí at samráðst var um nýtt ársverk, at mótstøðuparturin hjá YF, skuldi vísa seg at vera bæði Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið. Í praksis førdi hetta til, at YF sat við samráðingarborðið sum tann einasta røddin, ið royndi at tryggja, at tað sum gjørt varð, var pedagogiskt forsvarligt. Hetta átti eyðvitað at verið aðaluppgávan hjá Mentamálaráðnum. Fakfelagið er tó sjálvandi eisini, til eina og hvørja tíð, áhugað í at tryggja neyðugu dygdina í tí, sum verður framt á útbúgvingarpolitiska økinum. Tá Mentamálaráðið soleiðis "fer í part við" Fíggjarmálaráðnum, ið einans tykist hava sum mál at fáa ein bíligari skúla, so kann tað fáa sera óhepnar avleiðingar fyri góðskuna á føroyska skúlaverkinum.

Eg skal ikki her, leggja meg útí, at myndugleikin hevur uppraðfest og niðurraðfest ymisk fak á miðnámi. Men at gera hetta upp á tann mátan, sum t.d. er hent í fakinum týskum, er heilt ósømiligt. At kippa týskt soleiðis burtur úr skúlaskipanini, bæði í framhaldsdeild og í miðnámi, kann koma Føroyum og føroyska samfelagnum aftur um brekku. Hetta tykist illa umhugsað. Týskt er framvegis næst størsta málið í Evropa.

***2. Hvat er passaligt næmingatal í flokkum?***

Í løtuni er næmingaloftið í miðnámi sett til 26 næmingar fyrsta árið og 24 tey bæði næstu árini. Tað eru vituligt fleiri meiningar um, hvat er rætta næmingatalið í flokkunum. Men tá ið Bill Clinton stillaði uppaftur til forsetavalið í 1998, var eitt høvuðsmál í hansara valstríði at minka næmingatalið í skúlaflokkunum. Tí at hetta var betri fyri innlæringarumhvørvið og trivnaðin hjá næmingum og lærarum. Sjálvur haldi eg, at 18 næmingar er rætta talið til ein miðnámsflokk.

### *3. Hvussu heldur tú, at hugburðurin hjá myndugleikanum er viðvíkjandi námsfrøði?*

Fram til umleið 2006 var tað soleiðis, at lærarar vórðu sendir til Danmarkar til taka verkliga námsfrøði. Vanliga bar tað tá eisini til at taka ástøðiligu námsfrøðina samstundis. Seinni var so møguligt skjótt at taka tilhoyrandi fakdidaktisku skeiðini. Eftir 2006 vórðu allir hesir møguleikar støðgaðir, og eingir kandidatar av miðnámi vóru aftur til námsfrøði fyrrenn á heysti 2013. Síðan hevur talið á kandidatum ligið um gott 15 um árið. Men fleiri hava ikki enn fingið høvið at taka fakdidaktisk skeið, hóast hetta er lovað teimum. Eg haldi annars, at vit eiga at gera tað gjørligt at taka alla námsfrøðina í Føroyum.

### *4. Hvussu heldur tú brúgvagerð millum grundnám, miðnám og hægri nám virkar í løtuni?*

Í løtuni er tað soleiðis, at tey sum undirvísa á grundnámi, eru limir í Føroya Lærarafelag (FL), tey sum undirvísa á miðnámi eru limir í YF og Føroya Tekniska Lærarafelag (FTL), og tey flestu, sum starvast á hægri námi, eru limir í Magistarafelagnum. Hesi feløg hava ikki fingist nógv við brúgvabygging millum námsligu stigini, tá tey tykjast hava ivaleyst at gera við at tryggja sínum egnu limum nóg góð kor. Eg veit tó, at lestrarvegleiðararnir, sum eru í holtur við at taka masterútbúgving í vegleiðing á Setrinum, m.a. arbeiða við at menna ein leist fyri størri brúgvabygging millum námsligu stigini. Eg meti, at tað er sera umráðandi, at vit royna at menna eina útbúgvingarpolitiska skipan í Føroyum, ið hevur sum mál at vera heildarkend, og ikki er ov merkt av ymiskum kongaríkjum, ið vaksa og mennast í hvør sína ætt. Næmingarnir eiga at merkja, at tað er ein logisk yvirgongd frá einum námsligum stigi til eitt annað.

### *5. Hvussu sær tú tín leiklut sum fakfelagsformaður?*

Eitt fakfelag er eitt løntakarafelag. Hetta eru løntakarar, ið selja sína arbeiðsmegi til ein arbeiðsgevara. Tað ræður tí um at fáa sum mest fyri ta tíð, ein leigar sína arbeiðsmegi til arbeiðsgevaran. Tískil er reallønarvøkstur avgjørt mest umráðandi í fakfelagsarbeiði. Tað er tó ikki einans peniningasamsýningin, ið hevur týdning. Eisini t.d. arbeiðstíð, arbeiðsumstøður og trivnaður hava týdning fyri læraran. Samanumtikið verður ein lærari nógv betri undirvísari, kennir hann seg virdan og raðfestan av landsins myndugleikum. Stóra avbjóðingin liggur sostatt í at fáa samráðingarmótpartin at skilja hetta.

### *6. Er samstarv millum YF, Tekniska lærarafelagið og Føroya Lærarafelag?*

Í 2012 løgdu Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Lærarafelag Handilsskúlans saman. Samanlagda felagið fekk navnið: Yrkisfelagið Miðnám. Eftir mínari meining ein røtt avgerð og tað hevur eisini riggað heilt væl. Tað finst einki formaliserað samstarv við Tekniska Lærarafelagið ella Føroya Lærarafelag. Men óformelt samskifta vit og spyrja um viðurskifti hjá hvørjum øðrum. Mest er hetta samskiftið við Føroya Lærarafelag. Ein orsøk til, at samstarvið er ikki størri, enn tað er, man vera, at vit hava ymisk útbúgvingarstig og í mongum hava vit ymisk áhugamál.  Eg hevði onki havt ímóti, at allir lærarar, ið undirvísa í miðnámi, sum fráleið, løgdu saman í eittans felag.

# Kvalitativ eftirmeting

Kirsten Brix

Í november í fjør skipaði Føroya Studentaskúli og HF-skeið fyri temadegi um eftirmeting, har ymiskir eftirmetingarhættir vórðu lýstir. Eg skal her stutt greiða frá tí framløgu, eg hevði, um kvalitativa eftirmeting, sum eg sjálv havi brúkt nakrar ferðir. Kvalitativ merkir í hesum samanhangi, at næmingarnir skulu svara spurningum við egnum orðum, t.e. kvalifisera útsagnirnar, og ikki t.d. geva stig frá 1 til 5 ella brúka sera gott/ gott/ minni gott/ vánaligt.

Endamálið við at gera eina slíka eftirmeting er at kanna, um t.d. ein ávís undirvísingar-gongd hevur fingið tað úrslit, sum var ætlanin, tá ið tilfar, arbeiðshættir og tíðarkarmur vórðu vald.

Eftirmetingin er skrivlig. Fyrimunurin við tí er, at øll noyðast at hugsa sjálv og sjálv orða sínar meiningar. Ein annar fyrimunur, ið hevur víst seg, er, at fleiri evni, brigdi ella vinklar koma fram, tá ið næmingarnir sita hvør í sínum lagi og skriva, enn tá ið eftirmetingin er munnlig. Tá ið hon er munnlig, er mín roynd tann, at nøkur siga sína meining, men at tey flestu hava lyndi til at halda seg aftur og bara siga: “Hini hava sagt tað.” Sum oftast er tað ikki rætt. Sjálvt um meiningarnar kunnu líkjast, brúka næmingarnir ymisk orð og leggja dentin ymiskt. Og síðuvinningurin er so, at tey fáa eina medvitna fatan av tí, tey hava gjørt, og tað er eisini venjing.

Niðanfyri er dømi um eitt eftirmetingarskjal, sum varð brúkt, eftir at flokkurin hevði arbeitt við evninum samleiki í ymiskum tekstsløgum.

**Tilfar**

- Heiðrikur á Heygum: Sigarett (stuttfilmur)
- Høgni Miné: Glaskrukkan (stuttsøga)
- Sigri Gaïni: Samleiki (yrking)
- Karsten Hoydal: Barnið, bergið og blómurnar (yrking)
- Myndaframsýningin: Gull úr gloymskuni (Listasavnið)

**Spurningar**

1. Hvussu dámdi tær tilfarið? Hví?
2. Hvussu hevur tað verið at arbeiða við ymiskum tekstsløgum? Hví?
3. Hvat hevur tú lært?

4. Hvussu ert tú nøgd/ur við títt egna avrik? Hví?
5. Hvussu hevur arbeiðsháttturin riggað? Bólkaarbeiði, einstaklings- / pararbeiði, lærarframløga, stílur. Hví?
6. Hvussu hevur riggað at arbeiða við sBók? Hví?
7. Uppskot til evni, tekstir, tekstsløg, arbeiðshættir.
8. Navn: ________________

Summir spurningar kunnu brúkast afturvendandi, aðrir mugu lagast til til tað ávísa endamálið. Vanliga brúka næmingarnir umleið ½ tíma til at svara.

Til hetta slagið av eftirmeting skulu næmingarnir skriva sítt navn undir. Gera tey ikki tað, ber illa til hjá læraranum at gera sær eina niðurstøðu burtur úr teirra meiningum um tey ymisku punktini. Heldur onkur t.d., at bólkaarbeiðið ikki riggaði, so er neyðugt at vita, hvør viðkomandi er, hvørji onnur hava verið í bólkinum, hvussu arbeiðið hevur verið fyrireikað og skipað o.s.fr.

Endamálið við eftirmeting má vera at fáa íkast til at skipa undirvísingina og arbeiðið soleiðis, at øll fáa sum mest burturúr. Eru upplýsingarnar ónevndar, er tað ítøkiliga virðið í teimum ikki til stóra nyttu.

Tann kvalitativa eftirmetingin er bara ein møguleiki av mongum. Og hvussu, nær og hvat verður eftirmett, er ymiskt í ymiskum lærugreinum og flokkum.

# Meditatión á tímatalvuni

Kristin Lange
Týðing: Tórður Johannesarson

**Kristin Lange er cand. mag. í sponskum og eingilskum. Hon er eisini lærari í Transcendentalari Meditatión. Hon hevur undirvíst á ymiskum ungdóms-útbúgvingum, kvøldskúla og yrkisskeiðum. Hon var saman við øðrum, sum roynd u at byrja ein eftirskúla í Danmark, sum skuldi hava meditatión á tímatalvuni.**

Á heysti 2014 var eg í tríggjar mánaðir í Ekvador, tí at eg var knýtt at eini royndarverkætlan hjá ekvadorianska kenslumálaráðnum. Vit fingu eisini stuðul frá David Lynch grunninum. Ætlanin var liður í, at næmingar á ymiskum skúlum fingu møguleika at læra Transcendentala Meditatión (stytt TM), og vita um hetta háttalag kundi betra um læringina og sálarliga umhvørvið á skúlunum.

Tá ið eg kom til Ekvador, bleiv eg saman við tveimum øðrum TM-lærarum knýtt at einum stórum skúla í einum hampiliga stórum býi í Andesfjøllum, 2800 metrar yvir havinum. Tað serstaka við skúlanum var, at hann var barnaskúli fyrrapartar og studentaskúli seinnapartar.

Avgjørt var, at øll børnini yvir 10 ár skuldu læra TM. Eftir at hava vegleitt rektara og flestu lærarar, fóru vit undir at læra tey elstu børnini í fólkaskúlanum og teir yngstu studentaskúlanæmingarnar at nýta háttalagið. Samanlagt lærdu umleið 700 næmingar teknikkin teir tríggjar mánaðirnar, ið eg var á skúlanum.

Tað fer fram á tann hátt, at útvaldu flokkarnir høvdu ein tíma í fimm dagar, har teir lærdu meditatiónsteknikkin. Sum lærari á ymiskum ungdómsútbúgvingum í eini 10 ár, upplivdi eg á fyrsta sinni, at næmingarnir vóru keddir, tá ið tímarnir vóru komnir at enda. ”Nei, bara ein tíma afturat!” róptu børnini. Møguliga vildu tey sleppa undan støddfrøði og eingilskum, men ein sannroynd var, at meditatión fangaði teirra áhuga.

Eftir, at skeiðini vóru liðug, var avbjóðingin at fáa tey at halda fram og fáa meditatiónina til vana, og at hjálpa teimum næmingum, sum høvdu ilt við at meditera av fríum vilja, t.e. uttan á nakran hátt at kýta seg.

Tað var nakað heilt serligt at uppliva næmingarnar meditera. Teir kundu vera rættiliga ófriðaligir og larma illa, tá ið vit komu inn í flokkin, men tá ið teir høvdu lært meditatión, var friður í skúlastovuni. Teir næmingar, sum ikki vildu meditera av onkrari orsøk, skuldu vera í flokkinum, men skuldu vera kúrrir, so øll høvdu eina løtu í tøgn saman. Hesir høvdu torført við at sita stillir, meðan hini, sum dugdu at nýta teknikkin, vóru friðarlig.

## Hvat er Transcendental Meditatión?

TM er ein einfaldur og ikki uppgjørdur (t.e. sjálvvirkin) mentalur (t.e. sinnisligur) teknikkur, sum tú útinnir 15-20 minuttir tvær ferðir um dagin. Tú setur teg væl í einum stóli og letur eyguni aftur. Í mun til annan meditatiónsteknikk, so krevur TM ikki nakað slag av hugsavnan (t.e. konsentrering) ella roynd at hava tamarhald á sinninum. Teknikkurin savnar seg heldur ikki um at eygleiða, soleiðis sum verður gjørd t.d. í *mindfulness*. Teknikkurin er sum sagt einfaldur; men tað krevst persónlig vegleiðing fyri at tryggja, at tú fær veruliga fatur í mannagongdini, og harvið eisini ætlaða ágóðan.

Tann ítøkiliga nýtslan av TM ger sinnið róligt, og tú gerst varugur við egna persónliga sinnisstøðu - ein støða sum er bygd á hvílandi vakinleika, t.e. at tú gerst meira *vakin* enn í vaknari sinnisstøðu, og samstundis meira *hvílandi* enn í sovandi ella droymandi sinnisstøðu - tú kemur í eina 4. tilvitskustøðu. Talan er um eina almenniskjaliga sannroynd, sum gevur næmingunum tryggleika, so teir ikki kenna seg so strongdar, og megna tí betur at hava tamarhald á sær sjálvum. Teknikkurin ger, at teir í minni mun róta seg út í nakað býtt, t.d. lógarbrot, royndir við rúsevnum ella okkurt annað.

Síðan Maharishi Mahesh Yogi kom við TM til vesturheimin seinast í sekstiárum, hevur háttalagið verið rannsakað í eini 600 vísindaligum kanningum, harav eru 380 givnar út í tíðarritum við ”peer-review”, og er meditatiónin soleiðis blivin viðurkend á høgum vísindaligum stigi fyri sínar gagnligu ávirkanir.

Týðandi úrslit eru m.a., at tú fer í eina sera djúpa tilvitskustøðu, harafturat eina meira samanhangandi heilafunktión, málað við EEG, sum málar elektrisk signal frá ymsum økjum í heilanum. Aðrar royndir vísa eitt størri blóðgjøgnumrák í prefrontala cortex í heilanum undir TM.

Prefrontala cortex er økið í heilanum, sum hevur við okkara sjálvsfatan, dømievni, motivatión og sjálvstamarhald at gera. Økið hevur somuleiðis at gera við evnini at skyna á, hvat er rætt og skeivt. Tað verður sagt, at undir strongd, riggar hesin parturin av heilanum ikki, so vit reagera meira óborið (instinktivt), sum ein partur av eini primitivari yvirliving-armekanismu sum arvur frá djóraríkinum. Eisini lógbrótarar, misnýtarar og fólk við ADHD sigast at hava vánaligari blóðgjøgnumrák í prefrontala cortex. Á ein hátt kunnu vit siga, at talan er um funktionellar ”holur” í heilanum, tí at partar av honum rigga ikki. Ástøðið er, at TM er ein sjálvvirkin sinnislig tøkni til at fáa allar partar av heilanum virknar og at arbeiða saman.

Aðrar broytingar undir TM, sum kunnu málast, eru økt framleiðsla av serotonin, eisini kallað ”eydnuhormonið”, sjálvt um hetta er ein nervasendari (neurotransmitter) og broytt framleiðsla av cortisol, sum er eitt hormon, ið verður sett í samband við strongd.

Hesar broytingar undir TM eru grundarlag undir nógvum jaligum árinum á lívið. Vert er at leggja sær í geyma, at TM hevur gott árin á heilsuna hjá okkum, her verður eisini hugsað um hjarta- og æðrasjúkur, minni strongd, størri lívsvirði og færri sálarligar trupulleikar. Í sambandi við skúlaviðurskifti kunnu vit nevna: betri læringsevni, bindindi og uppmerk-semi, og ikki minst størri kreativitet og evni at hvíla í sær sjálvum. Alt hetta er fyri langari tíð síðan staðfest í rúgvuvís av publiseraðum granskingargreinum í viðurkendum peer-reviewaðum vísindatíðarritum.

## Hvussu gekk á mínum skúla?

Ongin verulig eftirmeting varð gjørd, tá ið eg fór aftur til Danmarkar, men sambært rektaranum og fleiri lærarum vóru flokkarnir meiri friðarligir, og færri ósemjur vóru millum næmingar. Tíðin, sum fór til meditatión, bleiv vunnin inn aftur, tí at næmingarnir arbeiddu meir savnandi og málvíst eftir at hava mediterað. Lærararnir sýntust at vera í iva og ilskaðust, tá ið vit komu inn í flokkarnar at seta teir í gongd við meditatiónina. Sum frá leið blivu teir meiri jaligir og fyrikomandi, sjálvt um vit komu inn, meðan teir undirvístu.

Sum heild hevði tað verið best, um lærararnir á skúlanum høvdu staðið fyri meditatiónini. Nakrir teirra dugdu væl at síggja virði í hesum, men tað kom ongantíð inn sum veruligur vani. Tað krevur nokk, at meditatión skal á tímatalvuna og sameinast við praktiska arbeiðið á skúlanum, tað varð ikki heilt gjørt, meðan eg var har yviri. Tá ið eg fór heim, var tað bara helvtin av teimum eldru næmingunum, ið høvdu lært teknikkin. Fleiri av næmingum í flokkum, sum vit ikki høvdu lært upp, vendu sær ofta til okkara fyri at vita, hvussu teir skuldi læra tað. Tað var týðiligt, at hesir høvdu hoyrt nógv gott um meditatión frá vinfólkunum.

## Eitt sindur um David Lynch grunnin

Grunnurin stuðlar serliga TM-verkætlanum á skúlum í sosialt raktum býlingum í USA og skúlum í Latínamerika – harafturat bólkum, sum gomlum hermonnum við PTSD, kvinnum, ið hava verið út fyri harðskapi, fangum o.ø. Um áhugi er fyri verkætlanini í Føroyum, er møguleiki at søkja úr grunninum. Á teirra heimasíðu https://www.davidlynchfoundation.org/ kann lesast um royndir viðvíkjandi transcendentalari meditatión í skúlasamanhangi. Fleiri upplýsingar eru eisini at finna á http://transcendental-meditation.dk/.

| **Niðanfyri siga nakrir av næmingunum frá um sínar royndir við meditatión eftir teir tríggjar mánaðirnar. Tað serliga var, at næmingarnir lærdu ikki um nakað ástøði, men bara meditatións-teknikkin. Frásagnirnar hjá teimum eru ikki bygdar á propaganda ella eftir-rationaliseringar.** |
|---|
| Fernanda: Hey, eg eri mediterandi, tað vil siga, at eg brúki meditatión. Sjálvt um tíðin var stutt, havi eg upplivað eina rúgvu. Nú slappi eg altíð av, og hetta hevur gjørt, at eg klári meg betur í skúlanum. Eg hvíli meg nakrar minuttir um dagin, og hetta ger, at eg fái nógva orku restina av degnum. Mest av øllum fegnist eg um, at sinnalagið er blivið betri. Mær dámar væl at meditera og vil mæla øðrum til at gera tað sama. |
| Hey, eg eiti Vanesa. Síðan eg byrjaði at meditera, havi eg havt tað betri. Próvtølini eru batnað, og eg hvíli betur í mær sjálvari. Tá ið eg mediteri, kenni eg meg róliga og kenni frið á mær. Hini siga eisini, at eg síggi betur út. Tað kennist eins og eg sveimi, og at kenni meg vakrari nú. Eg kenni meg eisini meira nøgda, tí at nú verði eg næstan ongantíð ill longur. Mær dámar væl at meditera, og eg kenni meg væl, meðan eg mediteri. |
| Eg eiti Katerin og vil siga um mínar royndir við TM. Tað kennist væl at meditera, tí at tað hjálpir at loysa trupulleikar. Míni foreldur hava sagt, at eg havi broytt atferð. Eg havi loyst mínar trupulleikar, og tað hjálpir mær at slappa av sinniliga. Míni próvtøl eru blivin betri, sjálvt um eg taki tað róligt. |
| Eg eiti Christopher. Eg skal siga tykkum, hvussu tað er at meditera. Síðan eg lærdi hetta, eri eg byrjaður at kenna meg betri og eri róligari. Eg kenni meg sum eitt betri menniskja. Serliga eru mínir trupulleikar viðvíkjandi uppmerksemi horvnir. Próvtølini eru betri. Eg uppføri meg eisini betur mótvegis mínum foreldrum. Møðin er horvin, og eg sovi betur. Mítt lív er sum heild blivið betri, og eg takki av heilum hjarta mínum meditatións-lærarum. Takkað verið teimum, so havi eg fingið eitt betri lív. |
| Eg eiti Estefania. Tað er sera vakurt, at man við TM kann uppliva eina djúpa og varandi hvíld. Eg hvíli sinnið og kroppin og havi fingið orku, intelligens, kreativitet og uppmerksemi. Somuleiðis eru lagið og heilsan blivin betri. Eg stúri heldur ikki so nógv sum áður. Hevði tunglyndi og strongd, men alt hetta er horvið. |
| Eg eiti Erika Freire. Meditatión er ein sera góð uppliving, sum hevur hjálpt mær at laga meg eftir mær sjálvari og mínum vinfólkum. |
| Eg eiti María Mercedes. Eg havi mediterað TM, síðan eg byrjaði á skúlanum. Eg havi merkt broytingar, sum eru til tað betra. Til dømis eri eg nú vakin í tímunum, fyrr sovnaði eg ofta. Hetta hevur hjálpt mær at laga meg til skúlaumhvørvið á ein betri hátt. Eg fati tingini betur og skjótari. Sjálvt um eg eri troytt, eri eg vakin og hugagóð. Sjálvt um tímarnir liggja seinnapartar, megni eg at gera skúlating, tá ið eg komi heim. Tá ið eg vakni og mediteri, merki eg, at eg fái eyka orku restina av degnum. |
| Melanie: Hey, síðan eg byrjaði at meditera, havi eg upplivað í broytingar í mær sjálvari. Eg savni meg betur í tímunum og skilji betur tað, sum lærararnir siga. Um tað er onkur trupulleiki, so taki eg tað róligt, og loysi hann skjótari. Eg verði ikki so troytt longur. Tá ið eg vakni um morgnarnar, eri eg úthvíld. Mítt sinni er í frið, og nú skikki eg mær betur. Meditaión hevur givið mær friðsælu. |

# Serbreyt á miðnámi – mennandi møguleikar

Óli Wolles

*Skulu fólk við menningartarni nú eisini ganga í miðnámsskúla? Gevur tað nakra meining?* Soleiðis hevur onkur spurt meg, síðan tað kom fram, at farið verður undir nýggja serbreyt á Miðnámsskúlanum á Kambsdali í heyst. Í hesi grein fari eg at royna at svara hesum spurningum. Eg fari fyrst at geva eitt stutt yvirlit yvir hugsjónarligu *bakgrundina* og *gongdina* í málinum og síðani at lýsa hugsjónarliga *málið* við hesum skúlatilboði.

## Bakgrundin

Tá Sameindu Tjóðir (ST) var stovnað eftir 2. heimsbardaga, varð ein heimsyvirlýsing um mannarættindi gjørd og samtykt 10. des. 1948. Henda heimsyvirlýsing ásetur, at tey rættindi, ið nevnd eru í yvirlýsingini, eru galdandi fyri øll fólk uttan mun til fólkaslag, átrúnað, kyn, tjóðskap ella politiska hugsjón. Men onki verður sagt um fólk við breki. Tað ganga mong ár afturat, áðrenn fólk við breki verða nevnd í einum almennum manna-rættindaskjali. Tað verður ikki gjørt fyrr enn í Wien-yvirlýsingini frá 1993. Her verður staðfest, at mannarættindi galda fyri øll menniskju, eisini tey við breki – tey ófullføru (disabled).

Longu í 1987 royndi Italia at fáa gongd á arbeiðið at gera ein ST-sáttmála um fólk við breki, men fekk ikki undirtøku. Svøríki royndi aftur í 1989 við sama úrsliti. Kortini setti hetta gongd á nakað, og í 1993 samtykti ST "Standard Rules on the Equalization of Opportunities for Persons with Disabilities", sum Føroya Landsstýri hevur fingið týtt og givið út á føroyskum (*Fyrimyndarreglur um javnlíkar møguleikar fyri fólk, ið bera bre*k; Almanna- og Heilsumálaráðið (1999) 2004). Her verður dentur lagdur á, at øll lond eiga at tryggja javnbjóðis møguleikar til fólk við breki á øllum økjum – eisini á skúlaøkinum. Hetta eru tó ikki bindandi, men bert vegleiðandi reglur.

Á UNESCO ráðstevnu í Salamanca í Spania í juni 1994, har umboð fyri 25 felagsskapir og 92 lond viðgjørdu útbúgving fyri øll, varð ein yvirlýsing samtykt, ið seinni er kend sum Salamancayvirlýsingin. Her verður dentur lagdur á, at skúlaverkið skal bjóða javnbjóðis útbúgving til allar borgarar uttan mun til brek, og mett verður, at ein inkluderandi skúla-skipan, ið hevur fjølbroyttar útbúgvingarætlanir og –hættir, er besti mátin at fáa eina góða skúlaskipan fyri øll. Salamancayvirlýsingin er, sum navnið sigur, ikki eitt løgfrøðiliga

bindandi skjal, men ein yvirlýsing. Henda yvirlýsing hevur tó havt stóra ávirkan á skúlapolitikkin í flestu londum, og hugsjónirnar í Fyrimyndarreglunum og Salamanca-yvirlýsingini síggjast eisini í okkara fólkaskúlalóg.

Tá Meksiko í 2001 tók málið upp aftur um mannarættindasáttmála fyri fólk við breki, bar til. Árið eftir setti ST-aðalfundurin ein arbeiðsbólk at arbeiða við málinum. Tað var New Zealendski ambassadørurin John Don MacCay, sum við eldhuga og dugnaligum diplomati megnaði at leiða henda arbeiðsbólk gjøgnum 8 fundir næstu árini, til hann í august 2006 kundi leggja eitt uppskot fram, sum semja var um. John Don MacCay vísti seg at vera ein meistari í at finna semjur og byggja brýr tvørtur um stórar mentanarligar, sosialar, tjóðskaparligar og átrúnaðarligar gjáir. Eftir 5 ára arbeiði, sum er rættiliga skjótt í hesum høpi, varð uppskotið samtykt á ST-aðalfundinum 13. desember 2006 (sí www.un.org/disabilities >Convention). Føroya Løgting samtykti 13. mai 2009 einmælt at seta henda sáttmála í gildi í Føroyum. 1. juli 2015 høvdu 159 lond skrivað undir sáttmálan, og 156 teirra hava sett hann í gildi. Hesin sáttmáli ásetur í § 24 m.a., at fólk við breki skulu hava atgongd til inkluderandi, góða og ókeypis útbúgving, t.e. saman við hinum ungu. Tey skulu ikki útihýsast frá vanligu útbúgvingarskipanini.

## Gongdin

Tá skúlatilboðið Rásin varð stovnað í 2003, var fyrsta ítøkiliga stigið tikið at bjóða næmingum við serligum tørvi víðari útbúgving. Her var pláss til 7 næmingar triðja hvørt ár. Tá serflokkur fyri næmingar við autismu varð tikin upp í Hoydølum á sumri 2013, var fyrsta ítøkiliga stigið tikið at inkludera næmingar við serligum tørvi í vanligu miðnámsskúlaskipanina. Her er talan um næmingar, sum taka eitt vanligt studentsprógv, men sum mugu fáa serliga tillagaðar umstøður til skúlagongdina.

Tað eru tó sjálvsagt nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki megna at taka eitt vanligt miðnámsprógv, og eisini teimum hava vit skyldu at veita eitt nøktandi skúlatilboð.

Á sumri 2014 settu Mentamálaráðið og Almannamálaráðið í felag ein arbeiðsbólk at gera uppskot til miðnámsskúlatilboð sum heildartilboð til ung við serligum tørvi. Hesin arbeiðsbólkur vitjaði skúlar í Íslandi og í Danmark og royndi at fáa tað besta úr báðum skipanum: Úr Íslandi serliga hugsanina at hava serbreytina inn á vanliga miðnámsskúlan, har javnaldrarnir ganga, og úr Danmark serliga OCN eftirmetingarskipanina. Álit varð handað landsstýrisfólkunum í mentamálum og almannamálum síðst í januar 2015, har mælt verður til at gera eitt **serliga skipað miðnám** (SSM) til næmingar við serligum tørvi. Hetta skuldi í høvuðsheitum fevna um tveir tættir: **serflokk** fyri næmingar, ið kunnu taka vanligt prógv við nøktandi umstøðum, og eina nýggja breyt, **serbreyt**, til næmingar, ið ikki megna eina vanliga miðnámsprórtøku hóast munandi stuðul. Umframt

hetta heldur serskúlin Rásin fram við nøkrum næmingum. Tilmælið leggur upp til at halda fram við serflokki í Hoydølum til tann bólkin og at byrja við einum flokki á serbreyt í 2015 og síðani at taka upp aftur árliga, og at ein miðnámsskúli afturat kann bjóða út serbreyt hvørt árið, til tørvurin er nøktaður um eini 5 ár.

## Málið

Skúlaárið 2015/16 er so fyrstu ferð, at farið verður undir serbreyt, nú 8 næmingar við serligum tørvi eru tiknir inn á Miðnámsskúlanum á Kambsdali. Teir fyrstu fimm byrjaðu skúlagongdina 20. august í ár – ársdagin eftir, at arbeiðsbólkurin hevði sín fyrsta fund. Tríggir næmingar koma so afturat seinni í heyst. Og so eri eg aftur, har eg byrjaði í innganginum: Gevur tað nakra meining at taka fólk við menningartarni upp á miðnámsskúla?

Her er fyrst umráðandi at gera greitt, at miðnám merkir ikki endiliga eitt studentsprógv, men heldur, at talan er um skúlastig millum fólkaskúla og víðari lestur ella arbeiðslív. Innihaldið á serbreyt er rættiliga nógv øðrvísi enn á gymnasialum miðnámi, og tað er lagað eftir førleikanum hjá einstaka næminginum. Undirvíst verður í smáum bólkum. Royndirnar bæði í Íslandi og í Danmark eru, at tað er gagnligt við fjølbroyttum lærarahópi við ymiskum førleikum, og at í miðal eigur at vera ein lærari (starvsfólk) fyri hvørjar tríggjar næmingar, um nakað munagott skal fáast burturúr. Onkur bólkur kann vera minni, onkur størri.

Sum nevnt er ásett í § 24 í ST-sáttmálanum um javnrættindi fyri einstaklingar, ið bera brek, at limalondini skulu tryggja eina innkluderandi skúlaskipan fyri øll, og at málið er m.a. at styrkja virðingina fyri mannarættindum, grundleggjandi frælsi og menniskjaligum fjølbroytni, at menna fólk, ið bera brek, teirra persónsmensku, gávur og skapandi evni, eins og teirra andaligu og likamligu førleikar so nógv sum til ber, at gera fólk, ið bera brek, veruliga før fyri at vera við í einum frælsum samfelag – og at øll tiltøk skulu vera í samsvari við endamálið, sum er fult at verða tikin uppí.

Endamálið er sostatt persónlig menning, bæði fakliga, likamliga, listarliga, persónliga og sosialt, og full luttøka í samfelagnum. Sostatt er ein týðandi táttur í lærumálunum at læra seg at vera virkin partur av samfelagnum. Tað er eyðsæð, at ein lærir best at liva í samfelagnum við at vera í samfelagnum.

## Innihald

Innihaldið í útbúgvingini á serbreyt er sum meginregla í trimum tættum: Vanligar lærugreinir so sum lesing, skriving, rokning, mál, søga og samfelagsfrøði – á tí stigi, sum næmingurin megnar. Annar tátturin er sosialir førleikar. Tað er ein sannroynd, at hóast tað eru teir fakligu førleikarnir, sum gera, at ein fær eitt starv, so eru sosialu førleikarnir

avgerandi fyri, um ein kann varðveita starvið. Tískil er umráðandi á serbreytini eisini at arbeiða nógv við sosialu førleikunum, so sum hvørjar reglur eru fyri uppmøting á arbeiðsmarknaðinum, hvat er hóskandi at siga – og hvat er ikki hóskandi at siga – við floksfelagan, við kundan ella stjóran o.s.fr. Triði tátturin er í stóran mun meira handaligur, at læra grundleggjandi førleikar í onkrum yrki, ein hevur áhuga fyri.  Serliga á sosialu og handaligu økjunum er OCN-skipanin viðkomandi eftirmetingaramboð.

OCN (Open College Network) skipanin byggir upprunaliga á at útbúgva fólk til praktiskt arbeiði, har alt virksemi kann greinast í ymisk førleikastig, sum skulu eftirmetast og so hvørt geva møguleika at fara víðari. Fyrsta stigið er grundleggjandi kunnleiki, annað stigið er førleikin at loysa eina uppgávu, og triðja stigið er førleikin at loysa eina uppgávu sjálvstøðugt og eftirmeta.

Grundhugsanin við OCN-skipanini er at kunna skjalprógva allar førleikar, sama um teir eru fingnir innan fyri ella uttan fyri skúlagátt. Skipanin kann skjalprógva førleikar á øllum stigum og verður viðurkend bæði í vinnulívi og á útbúgvingarøkinum. Í Bretlandi viðurkenna enntá universitet OCN-stig sum upptøkugrundarlag. OCN skipanin hevur síðani breitt seg til eisini at fevna um persónligar og sosialar førleikar, so hvørt sum skipanin er tikin í brúk á nýggjum økjum. Serliga í Danmark er stórt arbeiði gjørt at menna OCN-skipanina innan brekøkið.

*OCN Danmark* hevur til dømis ein pakka við 43 ymiskum OCN gongdum, sum fevna um sosiala- og persónliga læring, eitt nú "Persónligt reinføri", "Mál og samskifti", "Bólka-arbeiði og bólkasamanseting" umframt fleiri vinnurættað skeið, t.d. "Køkur og kantina" ella "Bilrøkt". Ein styrki í OCN skipanini er, at tað er vinnan sjálv, sum dygdarmetir og góðkennir tey einstøku vinnurættaðu OCN-skeiðini.

Við limaskapi í t.d. OCN Danmark fæst atgongd til øll tey skeið, sum eru til, í løtuni 1710 ymiskar OCN eindir í 273 virknum lærutilgongdum. Nýggj skeið koma alla tíðina afturat, so hvørt sum einstakir næmingar vísa á nýggjan tørv. Nýggjar OCN eindir verða gjørdar soleiðis, at teir lærarar, ið hava tørv á eini nýggjari eind, gera eitt uppskot til innihald. Síðan verður hetta uppskot gjøgnumgingið saman við eini serligari nevnd, sum OCN Danmark hevur sett – ella setir eftir tørvi. Henda nevnd ger neyðugar broytingar, so at innihaldið verður soleiðis, sum vinnan krevur. OCN hevur fleiri slíkar nevndir fyri ymisk yrki og øki, sum eru trygd fyri fakliga innihaldinum.

Við føroyskum limaskapi hjá OCN Danmark fæst atgongd til donsku OCN-skipanina. Málið er, at viðkomandi OCN-gongdir verða týddar til føroyskt og, har tað er neyðugt, verða lagaðar til føroysk viðurskifti. Við tíðini eigur eisini ein føroysk OCN-nevnd at vera stovnað til at viðgera OCN-gongdir til serlig føroysk viðurskifti, t.d. arbeiði á einum fiskavirki.

# Møguleikar

Hugsa tær eitt ungt fólk við menningartarni, sum dugir at gera kaffi, dekka borð og rudda og vaska upp; sum dugir at passa eina kopimaskinu og eina makuleringsmaskinu og at gera klárt til ein fund, so sum at seta á borðið, at tendra teldu og uppvørpu og at prenta viðkomandi tilfar og býta tað út. Ein genta ella ein drongur við hesum førleikunum kundi óivað havt eitt vart starv á flestu kommunuskrivstovum í landinum – og á rættiliga mongum skrivstovum og arbeiðsplássum annars – eisini fleiri lærarastovum!

Ein ungur maður hevur kanska hug at arbeiða upp á bilar. Tað er kanska órealistiskt, at hann nakrantíð verður bilmekanikari, men um hann dugir t.d. at vaska bil og polera, bæði innan og uttan, at skifta viskarabløð, fylla rútavask í, at turka amboð og heingja á pláss og kanska at bøta og skifta dekk, kundi hesin ungi maðurin verið hjálparfólk á einum bilverkstaði. Frá skúla í Malmø veit eg, at næmingar, ið høvdu lært at gera ein bil reinan og at eftirhyggja ymsu áfyllingarnar í motorrúminum, í fleiri førum fingu starv hjá bilaleigufyritøkum.

Ein ung genta hevur kanska hug at arbeiða við børnum. Men evnini røkka møguliga ikki til at gerast námsfrøðingur. Men við viðkomandi førleikum kann hon gerast eitt dugnaligt hjálparfólk í t.d. einum barnagarði. Ella um ein hevur hug at arbeiða í handli, so er umráðandi at duga at lesa eina dagfesting, og at elsta vøran verður sett fremst á hillini, meðan nýggjasta vøran verður sett aftast. Hevur onkur hug at kokkast, er neyðugt at duga grundleggjandi reinføri og at handfara ávís køksamboð fyri at kunna vera hjálparfólk í einum køki – t.d. einum skúlakøki.

Hetta eru bara dømi um mál at arbeiða við á serbreytini. Við at byggja á OCN-skipanina kunnu næmingarnir fáa skjalprógv fyri ítøkiligar førleikar á alskyns økjum, so arbeiðsgevarin veit, hvat hann kann vænta, at tann ungi dugir.

Havast skal eisini í huga, at í lívsdygdini hjá tí einstaka er tað ikki avgerandi, um ein hevur fakligar førleikar á hesum ella hasum øki, men at uppliva ein innihaldsríkan gerandisdag í samskifti við javnaldrar, har ein verður virdur sum menniskja hóast avmarkingar. Og tað sermerkta við serbreytini er, at undirvísingin er eftir tørvi og førleikum hjá tí einstaka. Hjá onkrum er fyrsta málið kanska at orða munin á ja og nei. Slíkt, sum hjá tí fullføra er sjálvsagt, kann vera mest týðandi málið at seta sær hjá – ella við – einum við serligum tørvi. Og tað hevur alstóran týdning fyri lívsdygdina! Og mong kunnu røkka munandi størri málum. Ongin toyggir seg longur, enn armarnir røkka, sigur eitt orðatak. Og kanska er tað rætt. Men við miðvísari undirvísing og hóskandi avbjóðingum ræður um at fáa øll – eisini tey við serligum tørvi – at toyggja seg so langt, sum armarnir røkka. Og mangan røkka teir longur, enn ein av fyrstantíð helt!

## Endi

At byrja við nevndi eg spurningin: *Skulu fólk við menningartarni nú eisini ganga í miðnámsskúla? Gevur tað nakra meining?* Mítt svar er JA. Tað gevur góða meining. Tað hevur alstóran týdning fyri sosialu menningina, tað gevur viðkomandi førleikar á mongum økjum, tað økir um lívsdygd og sjálvsvirðing, og samfelagsbúskaparliga økir tað um møguleikarnar at kunna røkja eitt starv. Og so læra øll hini á skúlanum, bæði næmingar, lærarar og starvsfólk annars, nakað um fjølbroytni okkara sum menniskju.

Ein avgerandi fortreyt er tó, um hetta skal eydnast, og hon er ábyrgdin hjá okkum øllum, bæði lærarum og næmingum: At vit sýna næmingum á serbreytini somu virðing, sum vit sýna øllum øðrum menniskjum! Tí virðing fremur sjálvsvirðing, og sjálvsvirðing gevur lívsdygd og áræði – áræði at læra og at taka við avbjóðingum og ábyrgd.

# Undirvísing ella læring?

## Læring hjá teimum ungu í tí seinmodernaða samfelagnum

Rógvi Thomsen

**Henda greinin er ein roynd at lýsa undirvísing og læring á miðnámi í mun til føroyska samfelagið, identitetsmenningina og læringina hjá teimum ungu. Aftaná eina lýsing av klassisku støðunum í lærufatanunum verða boð givin um transformativa læring, situeraða læring og praksisfelagsskapir sum loysn upp á fleiri av teimum tvørleikum, ið eru í gymnasialu skipanini. Hetta verður í seinna parti av greinini. Í høvuðsheitum verður bara nomið við gymnasiala partin av miðnámi á studentaskúlum, handilsskúlum og tekniskum skúlum við HTX. Á teimum meira yrkisrættaðu útbúgvingunum verður lærutilgongdin eitt sindur øðrvísi.**

**Greinin er í tveimum pørtum, ið bæði kunnu lesast hvør sær og saman. Upprunaliga er greinin hugsað sum ein samanhangandi grein.**

Kendi týski læri- og ungdómsgranskarin, Thomas Ziehe, fortaldi hesa søguna á eini konferansu um transformativa læring og identitet á Institut for Uddannelse og Pædagogik (DPU), Aarhus Universitet 28. januar í 2013*:" Eg havi hoyrt eina fitta søgu um eina 15 ára gamla gentu, ið spurdi foreldrini hjá sær: Hvussu komu tit á internetið, tá ið ongar teldur vóru?"*

Tað, ið Ziehe roynir at lýsa, er grundarlagið hjá ungdóminum at byggja teirra samleika upp. Hann vísir á, at tey ungu eru upprunafólk í teirra egnu samtíð. Tað eru ikki tey ungu, ið hava skapt fortreytirnar fyri teirra samtíð, men taka tey meira yvir sosiologiskar og sosialar karmar, ið eru um lív teirra frammanundan, karmar, ið tey royna at liva við og laga seg eftir.

Tá ið vit tosa um læring, ber als ikki til at skilja læring uttan at royna at skilja lívið og fortreytirnar hjá teimum ungu í samtíðini, og ikki minni okkara egnu fortreytir og lív, sum undirvísarar og sum tey, ið leggja læringina til rættis. Læring er – einfalt sagt – ikki nakað, ið er óheft av kontekstinum, hvørki umstøðunum á lærustaðnum ella samfelagnum annars.

Sjálvur plagi eg partvíst at brúka hugtakið kronosentrisk tíðarfatan um hetta hugtakið, at lívið hjá børnum og ungum skal livast í samtíðini og framtíðini. Samstundis, so eru tey alla tíðina í vanda fyri kronosentriskum fordómum, ið ofta eru ráðandi í samtíðini. Krono-sentriskt merkir her tey viðurskifti, at nógv vaksin og undirvísarar eru von við og hava

lyndi til at brúka: hugsanir, normar og mentanarlig mynstur í síni egnu samtíð sum leiðreglu í nútíðini, og síggja bæði fortíð og framtíð sum avvíkjandi í mun til teirra samtíð, ið er fortíðin hjá teimum ungu. Hetta eru tær umstøður, børn og ung ofta vaksa upp undir.

Tíðarinnar gongd fáa vit ikki gjørt so nógv við, men øll hesi viðurskifti eiga vit at gáa nógv meira eftir, og ikki minni pedagogisku og vísindaligu avleiðingarnar av hesi vitan.

## Hvat er læring og hvat er undirvísing?

Vit verða sostatt noydd til, um vit skulu leggja læring til rættis, fyrst at royna at greina tað samfelagið, ið er fortreytin fyri samleikanum hjá teimum ungu, og hvussu tey skapa sær samleika. Orsøkin til at eg nevni tað læring er, at eg skilji ímillum læring og undirvísing.

Hvør er so munurin á læring og undirvísing?

Tann mest einfalda lýsingin er, at høvuðsmunurin er, hvør er í miðdeplinum: tann lærandi ella tann undirvísandi. Læring verður fatað sum strembanin hjá tí lærandi sjálvum at ogna sær vitan og lívsroyndir. Tann lærandi er virkin ella aktivur í læringini, og uppgávan hjá undirvísaranum ella læraranum er at leggja til rættis umstøður fyri læring: at læra *av*. Flestu menniskju læra alla tíðina.

Undirvísing er tann skipaða flytanin av kunnleika frá undirvísaranum til tann, ið skal læra: at læra *um*. Tann lærandi *kann* læra av undirvísing, men tað er als ongin trygd fyri, at nakað verður lært av undirvísing í avmarkað tíðarbil. Hetta veldst um, hvørjar umstøður verða gjørdar fyri læring í undirvísingini. Læring sum hugtak og læring í veruleikanum fer víðari enn undirvísing.

Meðan orðið undirvísing saktans kann brúkast um at skapa umstøður fyri læring, so merkir frálæra eintýtt, at tann undirvísandi lærir frá sær, t.e. tað er bara lærarin, ið er aktivur. Lærarin er subjekt, meðan tann lærandi er objekt.

Tað ber til at skilgreina læring á ymiskan hátt:

| | |
|---|---|
| **Biopsykologisk** | Í eini **biopsykologiskari** fatan verður læring eyðmerkt sum prosessir, har nýggj neural mynstur verða gjørd í heilanum, og/ella at mynstur, ið eru har frammanundan, verða styrkt ella vikna. |
| **Psykologisk** | Í eini **psykologiskari fatan** verður læring definerað sum prosessir, har tann lærandi ognar sær nýggjar kompetansur. |
| **Pedagogisk** | Í eini **pedagogiskari fatan** verður læring definerað sum prosessir, har tann lærandi ognar sær tilvitaðar førleikar ella kompetansur. |

Til ber at siga, at ein persónur, ið lærir, eisini verður konstrueraður ella dannaður. Men tað ber eisini til at siga, at tann lærandi konstruerar ella sjálvur dannar seg. Er tað soleiðis, at tann lærandi fær stórt rásarúm í síni egnu læring, og dentur verður lagdur á menningina hjá tí einstaka, verður tað ofta kallað dannilsi, meðan tað meira er talan um frálæru og útbúgving, tá ið læringin frammanundan er avgjørd og skipað av læruætlanum, málum og neyvum kunngerðum og oftast fer fram á einum útbúgvingarstovni ella skúla.

## Føroyska samfelagið

Hyggja vit eitt sindur at samfelagnum, so er føroyska samfelagið ikki lætt at greina. Sjálvandi fyrst av øllum, tí tað er so lítil samfelagsgransking, men líka so nógv, tí stórir partar av okkara samfelag eru ikki eitt úrslit av medvitandi samfelagsplanlegging, men mest eru úrslit av ávirkanum her og har, einamest úr okkara gannalondum og Europa, ið vit eru mentanarligur partur av. Tað er ikki so nógv øðrvísi enn í øðrum londum, munurin er nokk tann, at avmarkaða samfelagsgranskingin ikki gevur okkum neyva vitan um ymisk fyribrigdi í okkara samfelag. Vit mugu gita. Tann planlegging, ið fer fram, er ofta merkt av tilvild og vantandi vitan heldur enn medviti. Ikki minst á skúla og útbúgvingarøkinum.

Hugsjónin um vælferðarsamfelagið og hugsanin um vælferðarstatin er og hevur eisini verið galdandi fyri Føroyar. Og um lurtað verður eftir politisku skipanini, so siga flest øll seg vera verjar og forsprákarar fyri hesi hugsan. Verður hugt eftir veruliga politikkinum, sæst, at samfelagsfatanin og politiska fatanin eru nógv meira merkt av tí, ið verður kallað kappingarstaturin ella kanska heldur kappingarsamfelagið.

## *Competences and Compentencies*

Siðvenjan í Norðurlondum hevur higartil verið, at útbúgving og skúlagongd hava verið sæddar bæði sum at ogna sær vitan og sum dannilsi til fólkaræðið. Yvirskipaða hugsjónin hevur verið vælferðarsamfelagið, har øll, á jøvnum føti, eru dannað til demokratiskar borgarar. Tað hevur við sær, at mann ikki bara hevur arbeiðsmarknaðarførleikar, men eisini lívsførleikar, í eini ógvuliga víðari fatan. Hetta er ein fyrimynd, ið øll tey Norðurlond hava strembað eftir, sjálvt um einki teirra er komið á mál við hesum.

Norðurlendska siðvenjan verður í hesum árum bjóðað av av einum globalum ráki, ið er í ferð við at broyta okkara fatan av skúla og útbúgving, og hvør kósin skal vera fyri skúlagongd og útbúgving.

Vit síggja, at bæði útbúgvingar og skúlar fáa heilt neyv førleikamál og námsætlanir, ið skulu røkkast. Ja, heilt inn í dagstovnarnar hava námsætlanirnar vunnið fram. Í hesi hugsan verða børnini og tey ungu mett í mun til nakrar førleikar, tey skulu hava á arbeiðsmarknaðinum.

Í mun til útbúgvingar, skúla og dagstovnar gevur tað eina ávísa meining, at børnini og tey ungu verða útbúgvin til arbeiðsmarknaðin, og greið mál verða sett fyri, hvussu hesi førleikamál verða rokkin.

Trupulleikin er bara, at fara vit ov langt við neyvt at definera, hvat tað er, børnini og tey ungu skulu duga og kunna, so forða vit teimum samstundis eisini í sjálvi at fáa greiðu á ymiskum – at verða partur av sínum egnu lærugongdum.

Í altjóða lærufatanum skilir mann ímillum *competences and compentencies*. Meðan *competences* er, sum kokkurin, ið dugir  at gera ein rætt til fulnar, so er *compentencies*, tað meira torgreidda, t.d. at uppfinna ein nýggjan rætt. Tað verður skilt millum teir ítøkiligu førleikarnar, ið kunnu brúkast her og nú, og so teir meira framkomnu ella elaboreraðu førleikarnar, at kunnu nakað, ið mann enn ikki veit, hvat er ella førir til. Lítil ivi er um, at tað er *compentencies*, vit duga best í Norðurlondum og skulu miða eftir.

Tey avmarkaðu førleikamálini eru ikki í samsvari við norrønu fatanina av dannilsi til fólkaræði, men tað, sum kanska verri er, er, at alt bendir á, at avmarkaðu førleikamálini heldur ikki eru í samsvari við tey krøv, vit fara at møta á framtíðar arbeiðsmarknaðinum. Vit vita sjálvandi ikki, hvussu framtíðin kemur at síggja út, men vit vita, at vit framhaldandi skulu læra og skapa nakað nýtt.

Næmingar og lesandi skulu tískil ikki bara læra at gera arbeiðið beint nú, men eisini læra at at menna arbeiðið og menna sína *compentencies* til framtíðina. Skulu vit fyrireika børnini og tey ungu til framtíðar arbeiðsmarknaðin, so hevur tað týdning, at vit ansa eftir ikki at seta so avmarkað og føst førleikamál, at vit forða børnunum og teimum ungu í at læra nakað nýtt alt lívið, at vit tvørturímóti hjálpa teimum við at varðveita teirra forvitni og framfýsni. Avmarka vit møguleikarnar á slíkan hátt og skerja læringina við trongum og neyvum læruætlanum, so leggja vit bara dent á *competences* og ikki *compentencies*. Tá fyrireika vit ikki børnini og tey ungu til avbjóðingarnar í framtíðini, hvørki á arbeiðsmarknaðinum ella lívinum annars.

Eitt tað ítøkiligasta dømið, eg havi funnið um eina ógvuliga avmarkaða fatan av *compentencies* er í føroysku løgtingslógini um gymnasialar miðnámsútbúgvingar frá 2012, soleiðis sum lógin er broytt í mai 2014:

> Kapittul 1 Stevnumið
>
> **§ 1.** *Stk. 2.* Útbúgvingarnar skulu hava eina greiða fakliga og námsfrøðiliga framtøku, og skulu tær styrkja og víðka *fakliga* førleika og lestrarførleika næmingsins.

Her er bara *competences*. Í lógini stendur fakliga við skákskrift her, sum vanliga merkir, at serstøk ella øll áherðsla skal leggjast á tað. Eg komi seinni nærri inn á hesa lóg.

## Kappingarsamfelagið versus vælferðarsamfelagið

Vælferðarsamfelagið er eyðkent av, at allir borgarar verða fataðir sum javnt settir, og hava tí bæði rætt til umsorgan í einum "rættarsamfelagi" og rætt til vælferð og samavgerð í øllum lívsins viðurskiftum sum aktivir luttakarar í fólkaræðinum. Hetta hevur eisini higartil verið endamálið við alment dannandi partinum av fólkaskúla okkara. Í endamálsorðingini í galdandi fólkaskúlalóglóg frá 1998 stendur:

"§ 2...Stk. 3. *Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.* "

Í kappingarsamfelagnum er grundarlagið, at vit alla tíðina kappast bæði innanhýsis og globalt, og at hetta er drívmegin í øllum samfelagslívi. At verða javnsettur er ikki endamálið, men fíggjarlig optimering bæði av tí einstaka og samfelaganum. Hildið verður, at tann einstaki bara hugsar sjálvsøkið, samstundis sum samfelagið sær samfelagsborgarnar sum íløgu fyri at tryggja kappingina í globala heiminum. Í mun til hetta verður bæði búskaparpolitikkur og útbúgvingarpolitikkur skipaður.

Meðan vælferðarsamfelagið legði dent á felagsskapin, so er menniskjasýnið í kappingarsamfelagnum tað egoistiska og opportunistisa menniskjað, sum bara hevur hug til at røkja egin áhugamál og at sætta sær sjálvum. Hetta er grundleggjandi brot við eitt menniskjasýni, ið stavar heilt frá upplýsingartíðini: "*Tað góða menniskjað*" til "*Tað egoistiska menniskjað*". Frá humanismu til teknokratiska búskaparliga hugsan.

Skúlin hevur langt aftur í tíðina verið eitt amboð til dannilsi. Av fyrstan tíð tjóðskaparligt dannilsi og alment dannilsi. Í norðurlendsku vælferðarsamfeløgunum hevur tað tjóðskaparliga fingið minni og minni pláss, ikki minst nú altjóðagerðin troðkar á. Alment dannilsi hevur verið sett í samband við hámentan, hetta samsvarar ikki væl við sosialdemokratiska prosjektið um javnrætt og javnstøðu mentanarliga, men eisini persónliga. Eftir er so dannilsi til menniskjað í felagsskapinum. Sum frá er liðið, so hevur seinni parturin av dannnilsishugtakinum tikið alt meira yvir í vælferðarsamfelagnum og fatanini av, hvussu menniskjað verður dannað til at vera javnsettur partur í felagsskapinum og at taka lut í fólkaræðinum.

Í kappingarsamfelagnum verður endamálið við skúlanum at læra at sætta sær sjálvum, at taka lut í arbeiðinum/samfelagnum, ikki av tjóðskaparligum orsøkum ella til gagns fyri javnvirði ella dugna felagsskapinum, men fyri at styrkja um kappingarførleikan hjá landinum og egináhugamálini hjá tí einstaka. Alment dannilsi kámast, um tað ikki beinleiðis kann vísast á, at almenna dannilsið hevur nyttuvirði fyri samfelagið beinan vegin. Útbúgving tryggjar, at tú fært fyrimunir fram um onnur, bæði í lívsdygd og lívsløn. Meðan skúlin higartil hevur havt sum endamál at skula tryggja líka møguleikar til upplýsing og

útbúgving, so roynir kappingarstaturin at gera øll til tøl niðast á tjóðarroknskapinum, ein og hvør lærir, at hvør er sær sjálvum næstur, menniskjað gerst eitt objekt heldur enn subjekt í síni egnu tilveru. Henda hugsan fær ógvusligar avleiðingar fyri skúlan.

## Skúlin í kappingarsamfelagnum - meira skal til hestin enn bokslið

Tað heilt stóra problemið við føroyskum útbúgvingarpolitikki, barna-og ungdómspolitikki, er vantandi yvirskipað hugsan og planlegging, sum eg eisini havi víst á frammanundan – tað ber til at vera samdur ella ósamdur í planleggingini, tað eru treytirnar í fólkaræðinum – men, tá ið yvirskipað hugsan og planlegging næstan ikki eru til, so ber heldur ikki til at diskutera fortreytirnar - tað verður tilvildin, ið ræður, so í veruleikanum hava vit hvørki skipaðan útbúgvingarpolitikk ella barna- og ungdómspolitikk.

Men hóast lítil og eingin skipað planlegging er av okkara útbúgvingarpolitikki, ið mest tykist at vera skipaður tilvildarliga, so fáa vit kortini nýggja lógir, kunngerðir og fyri-skipanir, ein av hesum er lógin frá 2012 um gymnasialar úrbúgvingar, broytt á vári 2014.

Tað er eyðkent fyri umsitingina í kappingarstatinum, at hon planleggur yvir høvdið á teimum, ið skulu arbeiða í skipanini. Tí masterplanurin er har frammanundan – kanska ikki altíð medvitið – men í praksis. Tann vitan, ið vit hava, verður oftast heldur ikki brúkt av planleggjarunum, tí teir tykjast at hava teirra egnu duldu dagsskrá, ið øll ikki kenna.

Tað sigur næstan seg sjálvt, at tá ið endamálið er menniskjað sum objekt og ikki sum subjekt, so verður luttøka ikki áhugaverd, ella luttøkan verður eitt eiti, ið onga veruliga ávirkan hevur á úrslitið. Politiskt so tykist tað, at ofta eru heilt onnur endamál við útbúgvingunum, heldur enn skynsemi og tí, ið er øllum samfelagnum at gagni og ikki minst læringini.

Herfyri løgdu stovnarnir á Kambsdali saman í ein stovn - uttan at taka støðu til, um tað er læringini at gagni ella ikki - so kann ikki annað enn staðfestast, at tað ikki er nakað tekin um yvirskipaða skúlahugsan ella planlegging aftanfyri.

At leggja saman við einum skotbrái upp á umleið tveir mánaðir, umframt at allir við-komandi stovnarnir í økinum ikki eru við, tá tykjast politisk fyrilit at ráða heldur enn skil. Tá so er, liggur hugsanin um at betra um læringina ikki fremst í huga sum grundgeving fyri slíkari samanlegging, men nakað, ið eykennir bureaukratisku hugsanina og stovnarnar í kappingarsamfelagnum, at effektivisera og spara gjøgnum samanleggingar.

Men tað er sera lítið, ið bendir á, at tað hevur nakra effekt upp á læringina, tí at tað fyrst og fremst eru karmar og fysiskar skipanir, arbeitt verður við, og ikki innihald, og so vónar mann, at synergieffektin kemur aftaná – júst vónar, men veit ikki.

Eg havi ikki hoyrt tikið upp á tungu, at henda samanlegging skal betra um læringina hjá næmingunum, og vit hava lov til at vera so bláoygd, at vit halda, at tað er endamálið við

einum skúla. Sama kann í stóran mun sigast um Marknagilsdepilin - ikki tí, tað kann verða, at læringin verður betri - men vit hava fáar ábendingar um, at tað er endamálið við samanleggingini.

Setrið og samanleggingarnar har eru annað dømi. Fleiri ymiskar útbúgvingar vórðu hurraðar saman, uttan at nakar setti sær spurningin: fáa vit betri læring og útbúgvingar burturúr? Tað granskingargrundaða grundstøðið, ið eigur at tryggja kvalitativa læru á einum hægri lærustovni, tykist at vera slept fyri løtuvinninginum av ásjónligum vøkstri. Meira skal til hestin enn bokslið. Tað ber ikki til at tryggja sær, at útbúgving hevur við sær meira brúkiliga læring, bara við at økja um nøgdina. Tað, ið hevur týdning, er møtið millum útbúgvingina og tann einstaka. Tað ber ikki til at læra nakað veruligt, um tú ikki upplivir, at tað gevur meining.

Á fólkaskúlaøkinum eru dømini legio.

Tað er ógvuliga eyðkent fyri kappingarstatin, at hildið verður, at ovurstórir stovnar eru betri enn nærleiki og demokrati. Og tað kann væl verða, at nøkur smáoyru á fíggjarlógini verða spard. Men sum frá líður, so er ikki vist, at vit fáa meira kvalifiserað menniskju burturúr. Og tá kann henda, at sparingin skjótt verður aftur eftir hæli, tí at tær kvalifikatiónir, ið skulu til í framtíðini, vanta í tí effektiva skúlanum hjá kappingar-samfelagnum. Mest tí at parametrið fyri skúla og útbúgving er eitt rokniark og ikki umhugsni fyri læring.

## Skúli og útbúgving sum kappingarparametur í globala heiminum

Tað, ið vit fáa at vita upp í saman í kappingarstatinum er, at meiri útbúgving fær okkum framum í altjóða kappingini – og sum hjávinning fáa vit eisini ungdómar at støðast í Føroyum. Seinna uppáhaldið skal eg ikki gera so nógv við, men fyrra. Tað eru ikki so fáir vansar við tankagongdini.

Ein tann fyrsti er kanska, at øll hini londini rundan um okkum eisini royna at økja kappingarførið um útbúgving, og so eru vit ofta komin líka langt. Tær dygdirnar í útbúgvingarskipanini, ið leggja dent á at skipa undirvísingarumhvørvi, ið leggja dent á dannilsi og at menna lívsfør menniskju, eru um at verða mistar í hesi hugsan.

Millum tað at kunna máta úrslit av læringini/undirvísingini og tað hugburðsliga er eitt sera vítt øki, ið snýr seg um trivnaðin og identitetmenningina, ið vit mugu hava við, um vit skulu gerast lívsfør menniskju. Men kappingarførleikin verður altíð tikin framum hesi viðurskifti í kappingarsamfelagnum, framum alt tað, ið vit kunnu kalla fyri burðardygga læring.

Annar vansi er tann ovurhonds denturin, ið verður lagdur á ítøkilig úrslit og læru-greinirnar, ið kunnu mátast og vigast, lærugreinar, ið eru sjónligar fyri kappingarførið í kappingarsamfelagnum. Meðan alt tað, ið er rundanum allar lærugreinarnar, alt tað, ið

ikki beinleiðis verður hildið at gagna tjóðarroknskapinum, alt tað, ið er kreativt og øðrvísi enn málrættaði førleikamálini, verður niðurraðfest ella hvørvur.

Men hetta kann skjótt fara at vísa seg at verða akkilleshælurin í verandi útbúgvingarhugsan. Tað, at leggja dent á tann ósjónliga partin av læringini, á kreativitetin, problem og prosjekthugsan, at skúlin leggur dent á menniskjað, kann skjótt vísa seg at vera størsti fyrimunurin í "globalu kappingarskipanunum" hjá teimum londum, ið klára at standa ímóti altjóða rokniarkshugsanini.

## Fylgir av skúla og útbúgvingarhugsanini í kappingarsamfelagnum

Sum so er tað einki galið í, at tað búskaparliga hevur týdning, men problemið er, at hugsanin gerst alt ov *rigid*. Altjóða kappingin niðurpínir menniskjansliga tilfeingið. Eitt dømi er t.d., hvussu nógv strongd fyllir í gerandisdegnum hjá nógvum, bæði ungum og tilkomnum. At leggja dent á eina burðardygga útbúgvingarskipan kundi verið ein tann størsti fyrimunurin hjá okkum, um kappingarsamfelagið ikki varð fatað so fýrakantað.

Hitt er, at politikarar og størsti parturin av embætisverkinum og vinnulívinum eru fongd av fíggjarligum *incitamentum*, sum oftast ikki hava samband við veruleikan, tí at hesi ikki taka hædd fyri, hvussu menniskju hugsa og eru virkin í sínum dagligdegi. Tað verður ikki hildið, at trivnaður, kreativitetur, fleksibilitetur og innlivan rættiliga hava nakran týdning. Tí, tá ið tað ikki kann mátast, eftirmetast og farast til próvtøku í, so er tað næstan ikki til, í øllum førum ikki nakað, ið styrkir um kappingarførleikan.

Í fólkaskúlanum veksur talið av næmingum, ið hava tørv á fleiri serligum tiltøkum. Á miðnámi er hetta rákið eisini væl og virðiliga við at fáa fótafesti. Er tað soleiðis, tí at fleiri næmingar hava trupulleikar bæði í skúlanum og við síni persónsmensku? Bæði og, tí vit vita í øllum førum nakað um fleiri av orsøkunum.

Ein partur er, at trýstið á tey ungu og børnini um "at blíva nakað" er so stórt, at nógv klára ikki alt tað, ið verður væntað av teimum. "At blíva nakað" verður bert rokkið um tað bókliga, denturin verður lagdur á tað fakliga, og tað verður gloymt, at næmingurin fyrst av øllum er eitt menniskja við tí fjølbroytni, eitt mannalív hevur við sær, og øllum teimum fjøllbroyttu gávunum, tey flestu hava. Hetta trýstið byrjar tíðliga í barndóminum, nú niður í 6 ára aldur í forskúlum.

Rúmligu lærugongdirnar verða avloystar av royndum og eftirmetingum, frágreiðingum og eftirliti og altjóða góðskumetingum, t.d. PISA. Tað er sigandi, at tað er OECD (*Organization for Economic Cooperation and Development), ið stendur fyri PISA-kanningunum. Hesar verða gjørdar, tí at hildið verður, at dygdin í skúlaverkinum í londunum er ein mátistokkur, ið kann geva eina ábending um kappingarførleikan í teimum ymisku londunum. Tað er sostatt ikki læringin, ið verður mátað, men um læringin er í mun til kappingarførið.*

*Men umframt tað, at PISA-kanningarnar eru óálítandi statistiskt, so ber eisini til at spyrja, hvat tað er, ið verður kannað og fortreytirnar fyri tí, ið kannað verður?* http://www.rogvithomsen.dk/pisakanningar/pisakanningin-er-obrukilig-tad-hon-kanska-kann-brukast-til-verdur-foeroyska-kanningin-ikki-brukt-til/

*Um so er, at vit skulu samanbera skúla, útbúgvin og dygdina av útbúgvingum millum ymisk lond – sum eg ikki haldi, at vit skulu - tí kanningarnar eru ikki álítandi, og geva ikki meining, tí mentanirnar – eisini skúlamentanirnar – eru so ymiskar í teimum ymisku londunum, og eru ikki sambærligar, so hevði verið meira eyðsýnt, at tað var* stovnurin hjá ST, ið stendur fyri útbúgving, vísind og mentan, UNESCO, ið samskipaði hetta arbeiðið at meta góðskuna í ymiskum londum við atliti at mentanum í londunum, um so er, at slíkar kanningar skulu gerast.

Úrslitið av hesi gongd er, at útbúgvingarnar og skúlarnir í størri og størri mun verða skipað og stýrd um reglur og kunngerðir. Tað meiningsgevandi við at taka eina útbúgving ella at ganga í skúla hvørvur til fyrimunar fyri løtuvinninginum hjá tí einstaka – perspektivið verður burtur. Hetta sæst aftur í stóra fráfallinum, og hvussu ringt tað er at motivera næmingar og lesandi.

## Fak og karakterir

Tað, at kappingarsamfelagið leggur so ovurhonds stóran dent á tað fakliga – og karakterir – ger, at lærarar og næmingar niðurraðfesta tað meira persónliga og menniskjansliga. Hetta ávirkar so eisini samspælið millum ta fakligu læringina og samleikamenningina hjá næminginum, ið hongur neyvt saman í sambandi við læringina.

Miðnámskúlanæmingar hugsa strategiskt, hvørjar lærugreinar teir velja, og hvat tey skulu leggja doyin á: har, ið tey hava bestan møguleika fyri at fáa góðar karaktertir. Men tað er jú ikki tað sama sum, at læringin er djypri. So stórir partar av teirri tíð, ið skuldi verið brúkt til læring, fer til at avlesa skipanina í skúlanum, rætta hondina upp, tosa eftir munninum á lærarunum og royna ikki at gera feilir ella spyrja býtt. Tað, at mann verður pressaður til at royna at fáa hægri karakterir, hevur ikki neyðturviliga við sær, at næmingarnir læra meira.

Kravið um góðar karakterir og kappingin um teir, hevur altíð eyðkent miðnámsskúlarnar, men trýstið og krøvini eru bara vaksin, tí at alt verður mátað og vigað á einum formligum skala.

Tað er sára menniskjansligt, at tey ungu á miðnámi útjavna trýstið við bara at læra tað, tey hava brúk fyri til próvtøku, so tey fáa høgar karakterir. Men tað er jú so nógv annað, ið eisini hevur týdning: at duga at handfara egið lív, fólkaræði, samstarv, dannilsi, o.s.fr. Allarhelst er tað onkur, ið sigur, at hesi øki eru ikki ein partur av uppgávuni hjá miðnámi.

Jú, tað eru tey, tí tað er ein avgerandi partur í motivatiónini hjá næmingunum, at undirvísingin ikki bara er faklig, men eisini viðkomandi og menniskjanslig, at næmingarnir merkja, at teir eru til og verða tiknir í álvara.

Drúgt orðaskifti hevur verið í Danmark um tær sokallaðu 12 tals-genturnar. Tað er rættiliga greitt, at hjá flestu teirra hevur mann róst úrslitinum heldur enn úrtøkuni av úrslitinum, also læringina. Nógv bendir á, at fleiri teirra duga væl at ramsa tað upp, ið tær vita, og at tað gevur góðar karakterir, tí tær duga væl at "pleasa" og at avkota, hvat onnur vilja hava. Tað ber til hjá summum teirra at fáa 12 í t.d. støddfrøði heilt til studentapróvtøkuna, uttan kanska nakrantíð at *skilja* støddfrøði.

Útbúgving og skúlagongd verður mett, vigað og mátað eftir, hvat ið kemur burturúr, ið kann samanberast við aðrar útbúgvingar og skúlagongd innanhýsis í landinum, ella samanborið við onnur lond (t.d. PISA-kanningarnar). Hvussu nógv er lært upp á so stutta tíð sum gjørligt (fíggjarliga rationalið), og um læruætlanir og førleikamál eru fylgd neyvt.

Heldur enn undirvísingarfrælsi er neyv stýring komin. Hesi viðurskifti legitimera útbúgvingarnar og skúlagongdina í teimum seinmodernaðu samfeløgunum. Fortreytirnar fyri skúlapolitikkinum eru krøv um, at íløgurnar í skúla og útbúgving skulu síggjast beinleiðis aftur í tølunum í tjóðarroknskapinum. Tað hevur aftur við sær, at bara slíkt, ið tykist at vera til nyttu í løtuni, verður raðfest, og sum oftast gerst hetta ein reint fakligur skúli, tí at nyttan av fakunum verður hildin at kunna síggjast beinleiðis aftur í búskapinum. Meðan tann parturin, ið børn og ung eisini hava brúk fyri í teirra menning, dannilsið og samleikamenningin, ikki verða raðfest.

Um vit taka eitt dømi úr fólkaskúlanum, so hava PISA-kanningarnar havt við sær, at tey, ið stjórna fólkaskúlanum, í nú skjótt 10 ár hava skipað skúlan soleiðis, at tað hevur verið lagdur ovurhonds dentur á málmenning og lesiførleika, tað tykist sum, at hesi eru einastu fortreytir fyri tí góða lívinum.

Løgið at hugsa sær, at okkara forfedrar hava ligið við áttamannafarinum í ódn á Norðhavinum og rópt: "*Gevið okkum eina bók at lesa, so vit vinna upp land aftur!*". Sjálvandi er tað ikki so einfalt, tí alt er kontekstbundið. Okkara forfedrar høvdu ikki so nógv brúk fyri málmenning og lesing. Í tí fólkaskúlapolitikki, ið hevur verið seinastu tíggju árini, so hava hesi viðurskifti verið *tann* grundleggjandi fortreytin, meðan tey í veruleikanum eru *ein* partur av fortreytunum fyri tí góða lívinum.

Hetta er so eitt dømi um, hvussu PISA-kanningarnar hava havt negativa ávirkan á fólkaskúlan og læringina har, tí tað tekur so nógva tíð frá so nógvum øðrum, ið eisini hevur týdning. Og so er tað sjálvandi eisini tann klassiski spurningurin, um tað ikki er innihaldið og dygdin í undirvísingini, ið skal eftirmetast, og ikki bara meiri tíð setast av til t.d. lesing.

Tí at sjálvandi skulu vit læra at lesa, men tað, ið hevur týdning, er, hvat vit lesa og hvat tað lisna verður brúkt til aftaná.

## Eitt stevnumið fyri miðnámsskúlan - tað fakliga menniskjað

Verður hugt at stevnumiðnum kapitli 1 fyri gymnasialar útbúgvingar í Føroyum: Løgtingslóg um gymnasialar miðnámsútbúgvingar frá 2012, broytt mai 2014:

> **§ 1.** Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru lestrarfyrireikandi og almennandi útbúgvingar, ið geva næminginum *fakligt* grundarlag fyri hægri lestri og framhaldandi útbúgving.
>
> *Stk. 2.* Útbúgvingarnar skulu hava eina greiða fakliga og námsfrøðiliga framtøku, og skulu tær styrkja og víðka *fakliga* førleika og lestrarførleika næmingsins.
>
> *Stk. 3.* Útbúgvingarnar skulu geva næminginum *fakliga vitan og hugfarsevni*[1]. Harumframt skulu útbúgvingarnar menna evni næmingsins at *djúphugsa og viðgera evni í frásjón.*
>
> *Stk. 4.* Næmingurin skal ogna sær *førleika at taka virknan lut í einum fólkaræðisligum samfelag, ið byggir á andsfrælsi, tolsemi og javnrættindi, og at taka á seg ábyrgd og skyldur í hesum høpi.*
>
> ...
>
> *Stk. 8. Útbúgvingarnar eru ein heild, og enda tær við próvtøku við støði í greitt fyrisettum fakligum málum.*

Og samanbera vit so við ta donsku:

> Bekendtgørelse af lov om uddannelsen til studentereksamen frá 12. juni 2013:.
>
> Kapitel 1
>
> *Uddannelsens formål*
>
> **§ 2...** *Stk. 2.* Formålet med uddannelsen er at forberede eleverne til videregående uddannelse, herunder at de tilegner *sig almendannelse, viden og kompetencer gennem uddannelsens kombination af faglig bredde og dybde og gennem samspillet mellem fagene.*
>
> *Stk. 3.* Eleverne skal gennem uddannelsens *faglige og pædagogiske progression udvikle faglig indsigt og studiekompetence. De skal opnå fortrolighed med at anvende forskellige arbejdsformer og evne til at fungere i et studiemiljø, hvor kravene til selvstændighed, samarbejde og sans for at opsøge viden er centrale.*

---

[1] Eg veit ikki, hvat hugfarsevni er. Tískil kann eg heldur ikki greiða frá, hvat ið hetta hevur við sær. Orðið er ikki at finna í nakrari orðabók.

> *Stk. 4. Uddannelsen skal have et dannelsesperspektiv med vægt på elevernes udvikling af personlig myndighed. Eleverne skal derfor lære at forholde sig reflekterende og ansvarligt til deres omverden: medmennesker, natur og samfund, og til deres egen udvikling. Uddannelsen skal tillige udvikle elevernes kreative og innovative evner og deres kritiske sans.*
>
> ...
>
> **§ 3.** *Uddannelsen til studentereksamen gennemføres med fokus på det almen-dannende og studieforberedende. Fagligheden er nært forbundet med sider af videnskabsfagene, og eleverne skal opnå almendannelse og studiekompetence inden for humaniora, naturvidenskab og samfundsvidenskab med henblik på at kunne gennemføre videregående uddannelse.*

Tað er ikki at taka seg aftur í, at føroyska og danska endamálið fyri gymnasialu skúlarnar umboða tvey heilt ymisk sjónarmið um læring, undirvísing og ikki minst ungdómin.

Føroyska stevnumiðið er út um alt mark fakligt, og við næstan ongum denti á persónligu menningina hjá teimum ungu. Læruhugtakið er ekstremt funktionalistiskt, t.e. at hildið verður, at læring ikki er kontekstbundin, men kann skipast óheft av umstøðunum, meðan tað danska er nógv meira merkt av einum holistiskum sjónarmiði.

Stk. 8 er eitt eklatant dømi um hesa víðgongdu funktionalismu:

> *Stk. 8. Útbúgvingarnar eru ein heild, og enda tær við próvtøku við støði í greitt fyrisettum fakligum málum.*

Fyrr í hesi grein havi eg víst á ein vansan við skúlanum í kappingarsamfelagnum: *"Annar vansi er tann ovurhonds denturin, ið verður lagdur á ítøkilig úrslit og lærugreinirnar, ið kunnu mátast og vigast, lærugreinir, ið eru sjónligar fyri kappingarførið í kappingar-samfelagnum. Meðan alt tað, ið er rundanum allar lærugreinarnar, alt tað, ið ikki beinleiðis verður hildið at gagna tjóðarroknskapinum, alt tað, ið er kreativt og øðrvísi enn málrættaðu førleikamálini, verður niðurraðfest ella hvørvur."*

Fara vit til:

> Stk. 4. *Næmingurin skal ogna sær førleika at taka virknan lut í einum fólkaræðisligum samfelag, ið byggir á andsfrælsi, tolsemi og javnrættindi...*

So gongur orðingin neyvt aftur í bæði dagstovnalógini og fólkaskúlalógini. Orðingin tykist at vera blivin eitt metafysiskt *statement*, ið skal vera við í allari føroyskari útbúgvingar-lóggávu. Tað er bara ongantíð nakar, ið hevur tikið upp kjakið, hvørji krøv handa orðingin setur til okkara undirvísingarverk. Tí verða tey eisini tóm og uttan innihald, nakað ið ber til at taka fram í veitslurøðum.

Tað skal ikki nógv hugflog til at síggja, at í teirri føroysku endamálsorðingini, í mun til ta donsku endamálsorðingina, so fyllir tað alment dannandi ella menningin av persónsmenskuni ómetaliga lítið, meðan tað fakliga fyllir næstan alt. Har er næstan bara tað, ið kann mátast og vigast. Føroyska lógin fer langt víðari móti kappingarsamfelagnum og einvísari fak-fakligheit[2] enn tann danska lógin, sum í stóran mun hevur varðveitt tað alment dannandi og menniskjaliga perspektivið, hetta er so gott sum burtur í føroyska endamálinum ella perspektivinum.

Meðan tann danska orðingin roynir at leggja dent á tað heila menniskjað ella eitt holistiskt menniskjasýni, so leggur tann føroyska dent á ein part av menniskjanum*: tað fakliga menniskjað.*

Vilja vit hava sjálvstøðugt hugsandi, innovativ og kritisk ung menniskju, so er henda stevnuskrá ikki leiðin. Vilja vit hava grunnskygd ung, so er hetta leiðin.

Í føroysku lógini er nógv *competences*, men tað er *compentencies*, vit hava brúk fyri í framtíðini. Næstan allur denturin í føroysku lógini verður lagdur á ítøkiligar førleikar, ið væntast at gera nyttu í nútíðarsamfelagnum, meðan tað, samfelagið hevur brúk fyri, eru innovativ og sjálvstøðugt hugsani menniskju, ið kunnu finna nýggjar leiðir, kreativ menniskju bæði til handa og anda.

## Tey ungu

Tann heilt stóra avbjóðingin hjá einum nútíðar ungdómi er persónliga identitetmenningin. Tey hava brúk fyri at fáa greiðu á: Hvør eri eg? Hvør vil eg vera? Hvat er endamálið við tilveruni? Hvat vil eg? Hvat skal eg leggja dent á?

Tá ið ung, ið ganga á miðnámi, verða spurd, hví tey ganga har, so svara tey ofta upp á, hví tey møta næstan hvønn dag, at tey koma orsakað av fríkorterunum og møguleikanum fyri einum sosialum ungdómslívi. Tað er avgerandi at vera við í tí sosiala, tí so er mann við í felagsskapinum, meðan undirvísingin er prísurin fyri at vera við í sosiala felagsskapinum.

Úrslitið er, at tey flestu klára seg hampiliga væl, fleiri detta niðurímillum. Nógv koma í eina tvístøðu millum ta fakligu læringina, sum tey av neyð royna at fáa við, samstundis sum tey definera seg í mun til vinir og ungdómsmentan.

Fakligi parturin verður upplivdur sum skylda, ið kemur at verða í andsøgn til sosiala partin, ið verður upplivdur sum nakað fjálgt og stuttligt. Á henda hátt kemur læringin at kennast sum nakað, ið er uttaná ella uttan fyri tað, ið hevur týdning. Men góð læring er

[2] Við fak-fakligheit verður hugsað um, at fakið og fakhugsanin, tekur heilt yvir í skúlaverkinum, sum amboð til kappingarførleika í kappingarsamfelagnum, meðan vælferðarsamfelagið grundar sína skúlahugsan á bæði fak og almennar menniskjansligar førleikar.

treytað av, at næmingurin heldur, at læringin hevur týdning og er engagerandi. Lærarar, ið megna at fáa hasi bæði at hanga saman í læringini, duga arbeiðið hjá sær.

Tað er eingin andsøgn millum góða fakliga læring og persónliga menning, tvørturímóti stuðla tey hvørjum øðrum. Tá ið tey ungu verða stuðlað í at menna samleika sín, so uppliva tey eisini, at tey megna og duga betur tað fakliga. Kanska tey velja okkurt frá, kanska tey velja okkurt, sum er á hægri stigi, enn tey annars megnaðu, tað er í fínasta lagi, bara tey eru medvitað um, hvat tey gera, og at tað gagnar teirra menning fakliga og menniskjansliga. At velja bara fyri at fáa betri karakterir gagnar ongum, og so slett ikki læringini. Men tað er støðan hjá nógvum miðnámsskúlanæmingum.

Øll gransking vísir, at ætla vit at motivera til læring, so er ikki nógv gagn í karakterum. Karakterir máta avrik og ikki arbeiðsgongdir. Ein ávís meining kann vera í at geva endaligar karakterir, men verður dentur ikki samstundis lagdur á konstruktivar afturmeldingar, so vísir øll gransking og allar royndir, at næmingarnir fáa nógv meira burtur úr at fáa afturmeldingar enn bert at fáa karakterir.

Granskingin vísir samstundis, at karakterir taka uppmerksemi og fokus frá tí, ið ætlanin er við teimum: eitt høgt fakligt støði, og gerast eitt mál í sær sjálvum.

Tað, ið eigur at gerast, er heldur at menna eina lærumentan, har fyritaksemi, framtakshugur og læruprosessir verða stimbrað og lønt.

## Útbúgving og læring

Ein tann størsti vansin við kappingarsamfelagnum er, at munur ikki verður gjørdur á útbúgving og læring.

Uttan umhugsni verður hildið, at fleiri útbúgvingar, ið verða settar á stovn, meiri læring fær mann. Hugsað verður kvantitativt heldur enn kvalitativt. Fyri ein part kenna vit hetta aftur í tosinum um fleiri útbúgvingar á Setrinum, har tað kvalitativa ikki fær nógva rúmd, men næstan bert tað kvantitativa.

Endamálið í kappingarstatinum er, at flest gjørligt skulu útbúgvast fyri minst gjørligar pengar. Kappingarsamfelagið ikki áhugað í læring, tí kvalitativa í útbúgvingunum. PISA kannar bert læringina í mun til, hvussu hon gagnar kappingarstatinum, men ikki tí einstaka. Og fleiri av tiltøkunum fyri at skapa meiri útbúgving hava negativa ávirkan á læringina, m.a. ovur stórir samanlagdir stovnar, ið eg havi víst á, mest eru bornir av bureaukratiskum effektiviseringshugsan, heldur enn áhuganum fyri dygdargóðari læring. Hetta hendir oftast samstundis sum, at færri og færri ressoursir verða settar av til útbúgvingarnar.

## Klassisk lærufatan

Hyggja vit eftir læringini, so fari eg fyrst at nema eitt sindur við ein klassikara innan útviklingspykologina, Piaget. Hann verður mettur á sama støði sum Freud, tá ið tað kemur til fatan av kognitivari menning, meðan Freud menti fatanina av psykodynamiska útviklinginum.

Enski sosiologurin, Giddens, sigur soleiðis um Piaget:

> *"ávirkanin av virkseminum hjá Piaget er ikki nógv minni enn tann hjá Freud."* Giddens 1993 s.72)

Útviklingur verður fataður sum ein kognitiv búningargongd í spenningsøkinum millum tað kognitiva og pykodynamiska í virknum sampæli við umhvørvið**.**

Kognitiv psykologi – kognitivt er tað, ið snýr seg um vitan, fatan ella sannkenning – fæst við tað, ið fer fram í tilvitskuni ella medvitinum.

Piaget hevur næstan bara fingist við kognitiva partin av læringini. Í lærufatan er Piaget mest kendur fyri sína fatan av, at vit læra assimilativt og akkomodativt. Grundleggjandi hjá honum er, at hann er konstruktivistur, ið meinar, at menniskjað við læring og sannkenning sjálvt myndar sína fatan av umheiminum. Hesi sjónarmið hava aftur við sær, at hann tekur frástøðu frá øllum áfyllingarpedagogikki.

| | |
|---|---|
| **Assimilativ læring** | Læring, har vit leggja aftur at skipanum, ið vit hava frammanundan. Nýgg vitan verður lagað til vitanina, ið vit hava frammanundan, verðin verður tolkað í mun til tær royndir, mann hevur frammanundan. Verðin *verður fatað í mun til verandi vitan*. Hetta er ein læra, ið ikki fer um mark. Í skúlanum er hon ofta tætt knýtt at fakunum og kann ikki brúkast í øðrum lívsviðurskiftum enn har, hon er lærd, t.d. til próvtøkur. |
| **Akkomodativ læring** | Læring, ið umskipar verandi skipanir, tann lærandi broytir *seg* í mun til umhvørvið. Læringin og umskipanin, ið kemur av akkomodativari læring, er orsakað av, at royndirnar, ið mann hevur frammanundan, ikki í fyrstu atløgu kunnu skipast í mun til verandi fatanarskipanir og skema. Tann lærandi má umskipa sínar innaru kognitivu strukturar og lærir nakað nýtt. Tey gomlu assimilativu skemuni verða umskipað, nýtt lagt afturat, og tann lærandi hevur lært nakað nýtt. |

Akkomodativ læring er ofta ógvuliga krevjandi læring, ið hevur við sær problematisering av teirri vitan, mann hevði frammanundan. Tá ið nýggir strukturar so eru mentir, so byrjar øll prosessin umaftur.

Tað er ikki soleiðis, at Piaget fatar lærugongdirnar sum statiskar frá tí assimilativa til tað akkomodativa. Læring er í hesari fatan ein gongd, har skipanirnar, ið longu eru til, alla tíðina interagera við skipanirnar, ið eru frammanundan. Skipanirnar mennast áhaldandi og broytast í neyvum samspæli við hvørja aðra. Ein støðug konstruktión og re-konstruktión, har strukturar, ið eru frammanundan, verða ávirkaðir av hvørjum øðrum, og nýggj læring legst afturat.

Piaget var upprunaliga biologur, og er hetta eisini ein biologisk javnvágsprosess. Læringin er alla tíðina í gongd; tá ið javnvág er, møta skipaninar nýggjum avbjóðingum, og prosessin heldur áfram.

Høvuðskritikkurin av menningarfatanini hjá Piaget er hansara universalisma, at ástøðini eru galdandi fyri øll menniskju, uttan mun til mentan og tíð, harvið gerast tey etnocentreraði. Í mun til læring verður hann mest kritiseraður fyri so gott sum bara at leggja dent á kognitivu menningina í læringini, og ikki sosialar og samfelagsligar umstøður og emotionellu menningina.

Sjálvur hevur Piaget sagt, at hann er greiður yvir avmarkingarnar í síni hugsan, men endamál hansara hevur fyrst av øllum verið at lýst týdningin av kognitivu búningini og sannkenningini fyri læring.

Í mun til kognitivu fatanina hjá Piaget, so hevur Vygotsky (1896-1934), umboðandi sovjettiska mentanarsøguliga skúlan, ment eitt ástøði um læring, har samfelagið og sosiala umhvørvið eru høvuðsleikarar í læringini, t.e. at Vygotsky ikki bara metir læring at vera samfelagsliga og sosialt treytaða, men at hesi eru fortreytin fyri læring.

Tað er ein klassisk ósemja millum Vygotsky og Piaget um, hvat ið er læring, og hvat er útviklingur:

> ”En anden ofte tematiseret usikkerhed i forbindelse med definitionen og forståelsen af læringsbegrebet drejer sig om forholdet mellem hvad der er læring (og derfor skal henregnes under læringspsykologien), og hvad der er udvikling (og derfor skal henregnes under udviklingspsykologien). F.eks. er der en ”klassisk” konflikt på dette punkt mellem to af læringspsykologiens centrale skikkelser, schweizeren Jean Piaget og russeren Lev Vygotsky, idet Vygotsky hævder at læring principielt går forud for og er grundlag for udvikling og tillagde Piaget det modsatte synspunkt (jf. Vygotsky 1971, s. 260 ff, og 1978, s. 84ff).”
> (Illeris 1999 s. 17)

Men á sama hátt sum í kognitivu fatanini hjá Piaget, so er psykodynamiski parturin av læringini eisini veikleikin í ástøðinum hjá Vygotsky. Grundleggjandi fatanin í mentanarsøguliga skúlanum er, at menniskjað í mun til djórini útviklar mentan, og at psykisku skipanirnar hjá menniskjanum eru grundfestar í samspæli við mentanina.

Lyklahugtakið hjá mentanarsøguliga skúlanum er virksemi, hvussu menniskjað um virksemi ognar sær mentanina, t.e. at menniskjað er virkið í hesi tilognan. Mest kent í lærufatanini hjá Vygotsky er ástøðið um næstu menningarzonuna:

> *Næsta menningarzonan hevur størri beinleiðis týdning fyri dynamikkin í intellektuellu menningini og framgongdini enn aktuella menningarstøðið.* (Vygotsky, 1974, s. 286)

http://www.rogvithomsen.dk/pedagogikkur/sovjettiski-psykologurin-lev-semenovich-vygotsky-og-mammumalid/

Næstu menningarzonu hevur Vygotsky definerað soleiðis:

> "the distance between the actual developmental level as determined by independent problem solving and the level of potential development as determined through problem solving under adult guidance or in collaboration with more capable peers" (Vygotsky, 1978, s. 86)

Kritikkurin av Vygotsky er, umframt vantandi fyrilit fyri psykodynamiska partinum av læringini, at hugsan hansara lætt kann føra til sera stýrda læring fram móti næstu menningarzonuni. Finnin Yrjö Engström hevur gjørt eina roynd at umdefinera og nútímansgera Vygotsky, soleiðis at hann gerst meira prosesskendur, og tann lærandi verður tikin meira uppí:

> *"Voksnes visdom udgør ikke en formålsbestemthed for børns udvikling. Social organisation og styrende virksomhed tilvejebringer et rum, hvori barnet kan udvikle nye, kreative analyser. En zone for nærmeste udvikling er en dialog mellem barnet og dets fremtid; det er ikke en dialog mellem barnet og en voksens fortid".* (Griffin & Cole 1984 s.62 partvíst eftir Engström 1998, s. 138, Illeris, Læring 1999, s. 48)

Skal eg taka samanum henda partin av greinini, aftaná at hava nomið við tveir av høvuðspersónunum í 20. øld, hvørs ástøði um læring hava havt stóra ávirkan, so sæst, at veikleikin hjá bæði Piaget og Vygotsky er tann psykodynamiski parturin av læringini.

Sjálvur fati eg læring m.a. sum eina lærugongd, har tey lærandi eru partur av og tekur lut í sosialum praksis, ið ger, at tey antin broyta ella menna teirra luttøku í sosialum praksis. Læring er eyðkend av, at subjektið verður til persón og mennir seg sum persónur við at taka lut og vera luttakari. Menning verður fatað sum ymiskir persónligir hættir at taka lut í sosiala felagsskapinum.

## *Education, education, education*

Á mangan hátt er útbúgving og skúlagongd vorðið ein partur av okkara dreymum um at kunna framskriva framtíðina. Vit vóna at finna gandasteinin, ið sigur okkum,

hvat brúk verður fyri í framtíðini - hvat framtíðin ber í sær. Vit royna at seta upp eitt langtíðar roknistykki, og tað hevur týdning fyri alt útbúgvingarøkið:"*Education, education, education.*"segði bretski forsetin, Tony Blair, longu seinast í nítiárunum, í eini víðagitnari røðu, har hann endurtók sum mantra: *Education, education, education.*

Í kappingarsamfelagnum er útbúgving tað sama sum at útbúgva arbeiðsmegi. Spurningurin er bara, um tað ber til at vera so framsíggin, at vit vita hvørja arbeiðsmegi, vit hava brúk fyri í framtíðarsamfelagnum?

Og kortini grunda vit skúlagongd og útbúgving á framskrivingar, sum um vit vita tað.

Men vit kunnu í øllum førum meta um, hvat verða heilt avgerandi førleikar í einum broytiligum, avbjóðandi framtíðar samfelag, ið lítið og einki kann sigast um frammanundan. Førleikar, ið sum meginreglu hava "tað heila menniskjað" sum fyrimynd, eitt menniskja, ið hevur førleikar, ið javnviga millum tað kognitiva, tað sosiala og tað emotionella, og at hetta sæst aftur í hugburðinum, framferðini, emotiónum, sosialum førleikum og relatiónum.

Tað er nógv, ið bendir á, at eitt skifti er á veg frá at leggja høvuðsdentin á innihaldið í læringini til at leggja høvuðsdentin á úrtøkuna av læringini. Tað er ikki soleiðis, at vit ikki framhaldandi skulu duga fakini – og tað væl - men tað er og verður líka so avgerandi, at úrslitið og úrtøkan av skúlagongdini ger fólk før fyri at læra at læra.

Tað einasta, vit vita um framtíðina, er, at broytingar og útviklingur verða, og at alt talar fyri, at stórar samfelagsbroytingar verða.

Um vit skulu útbúgva til framtíðina, ein veruleika vit ikki kenna, so kunnu vit ikki bara vera upptikin av, *hvat* næmingar og lesandi læra. Vit mugu vera meira upptikin av og leggja dent á at geva teimum royndir við læring, ið ger, at tey fáa hug til og eru før fyri at læra nakað nýtt alt lívið, og samstundis ansa eftir sær sjálvum sum heilum persóni. Tí at læra at læra verður førleiki, ið vit kunnu bera við okkum alt lívið, meðan løtuvitan er komandi og farandi.

Til endans kunnu vit so spyrja okkum sjálvi, hví vit skulu fáast við, hvat læring er? *Tí tað er grundarlagið undir allari góðari undirvísing.*

## Bókmentir

Bauman, Zygmunt (2006): *Flydende modernitet*. København: Hans Reitzels Forlag

Bruner, Jerome (1996): ***The culture of education.*** Cambridge: Harvard Univ. Press

Giddens, Anthony (1993): *Sociology*. Cambridge: Polity Press 2. útgáva

Højholt, Charlotte (ed) (2005): *Forældresamarbejde: forskning i fællesskab*. København. Dansk Psykologisk Forlag

Dewey, John (1971): *Experience and education*. Collier

Freire, Paulo (1974): *De undertryktes pædagogik*. København: Christian Ejlers

Gergen, K. J. & Gergen, M. (2005). *Social konstruktion – Ind i samtalen*. København: Dansk psykologisk Forlag

Giddens, A. (2004): *Modernitet og selvidentitet*. København: Hans Reitzels Forlag

Hjort, K., Qvortrup, A., Raae, P., (ed.). (2013): *Der styres for vildt*. Århus: KLIM

Illeris, Knud (1999). Læring – aktuel læringsteori i spændigsfeltet mellem Piaget, Freud og Marx. Roskilde: Roskilde Universitetsforlag

Illeris, Knud (2013): *Transformativ læring og identitet*. København: Samfundslitteratur

Illeris, Knud (ed.) (2014): *Læring i konkurencestaten*. København: Samfundslitteratur

Illeris, Knud (ed.) (2007*): Læringsteorier*. Roskilde: Roskilde Universitetsforlag

Illeris, Knud (ed.) (2012): *49 tekster om læring*. København: Samfundslitteratur

Klitmøller, Jacob og Sommer, Dion (ed.) (2015): *Læring, dannelse og udvikling*. København: Hans Reitzels Forlag

Lave, Jean – Wenger, Etienne (2003 [1991]): *Situeret læring*. København: Hans Reitzels Forlag

Mezirow, Jack (1978): *Education for Perspective Transformation*. New York: Teachers College, Columbia University

Olesen, Søren Gytz ed. (2003): *Pædagogik i sociologisk perspektiv: en præsentation af Karl Marx & Friedrich Engels, Aamile Durkheim, Michel Foucault, Niklas Luhmann, Pierre Bourdieu, Jürgen Habermas, Thomas Ziehe, Anthony Giddens*; redigeret af Søren Gytz Olesen & Peter Møller Pedersen. Viborg [Viborg-Seminariet, Reberbanen 13, 8800] : PUC

Rogers, Carl R. (2012 [1969]): Hvad er læring om signifikant læring. Í Knud Illeris (ed.): *49 tekster om læring*. København: Samfundslitteratur

Roger, Carl R. (1961): *On Becoming a Person*. Boston: Houghton-Mifflin

Tennant, Mark (2012): *The Learning Self: Understanding the Potential for Transformation,* San Francisco: Jossey-Bass

Vygotsky, L.S. (1974) Tænkning og sprog. Bd. II.København. Hans Reitzel

Vygotsky, L. (1978). "Interaction between learning and development." (pp. 79-91). In *Mind in Society*. (Trans. M. Cole). Cambridge, MA: Harvard University Press

Wenger, Etienne (2004 [1998]): *Praksisfællesskaber – Læring, mening og identitet*. København: Hans Reitzels Forlag

Ziehe, Thomas (2004): *Øer af intensitet i et hav af rutine - Nye tekster om ungdom, skole og kultur*. Red af Jens Christian Jacobsen. København: Politisk revy

http://www.rogvithomsen.dk/pisakanningar/pisakanningin-er-obrukilig-tad-hon-kanska-kann-brukast-til-verdur-foeroyska-kanningin-ikki-brukt-til/

http://www.rogvithomsen.dk/pedagogikkur/heilin-tann-plastiski-heilin/

http://www.rogvithomsen.dk/pedagogikkur/sovjettiski-psykologurin-lev-semenovich-vygotsky-og-mammumalid/

The Independent. Friday 20 March 2015
http://www.independent.co.uk/news/world/europe/finland-schools-subjects-are-out-and-topics-are-in-as-country-reforms-its-education-system-10123911.html

## Fakta

Rógvi Thomsen, cand. ped., pedagogiskur ráðgevi í Sernám.

Undirvíst í pedagogikki og starvslærari eitt longri áramál á lærara og pedagogútbúgvingini á Føroya Læraraskúla.

Undirvísingarroyndir frá universiteti, háskúla og fólkaskúla.

Skivað upp í leypin av greinum, serstakliga um pedagogisk og søgulig evni.

Fjøld av fyrilestrum um pedagogisk og søgulig evni.

Umfatandi skeiðvirksemi á pedagogiska økinum.

http://www.rogvithomsen.dk/

rogvit@mail.fo

*Úr søguni um búskaparliga hugsan*

# Hermann H. Gossen – og brúkaraatferð

Olav Absalonsen

**Í søguni um búskaparliga hugsan verður tosað um marginalismuna og marginalistarnar, sum komu fram um 1870. Millum teir kendastu persónarnar í sambandi við hesa hugsan eru William S. Jevons, Carl Menger og Léon Walras. Men undan teimum vóru nakrir minni kendir persónar, sum høvdu gjørt sær sínar hugsanir um eftirspurning og marginala nyttu. Vit hava fyrr skrivað í Miðnámsriti 2 og 3 um fransmenninar Jules Dupuit (1804-66) og Antoine Cournot (1801-77). Her skulu vit hoyra um týskaran Hermann Gossen (1810-58).**

Hermann Heinrich Gossen var føddur í 1810. Hann tók útbúgving í Bonn og Berlin innan lóg og almenna fyrisiting, og fekk hann síðani starv í Köln sum løgfrøðingur. Hann treivst ikki væl í hesum arbeiði, og leiðslan hjá honum var heldur ikki væl nøgd við hann. Í 1847 var hann noyddur at siga seg úr hesum starvi. Men tá hevði hann arvað nakað av pengum eftir pápa sín. Seinni bleiv hann partnari í einum tryggingarfelag í Köln.

Tey síðstu árini av lívinum nýtti hann nógva tíð at lesa búskap. Sambært Agnari Sandmo var henda gransking helst ein flýggjan inn í eina verð, har hann kundi gera okkurt meira munagott, enn hann hevði gjørt í starvinum innan fyrisiting. Tað megnaði hann eisini – ið hvussu er helt hann tað sjálvur, við tað at hann helt seg hava havt líka stóran týdning fyri búskaparfrøðina, sum Kopernikus hevði havt fyri stjørnufrøðina. Hinvegin hevði samtíðin ikki somu fatan av honum. Høvuðsverkið hjá honum kom út í bók í 1854. Tað fekk ikki nógva umtalu, og tá ið Gossen doyði í 1858, hevði hann ikki fingið nakra viðurkenning fyri sítt íkast til búskaparfrøðina (Sandmo 2011).

Bókin hjá honum *Entwickelung der Gesetze des menschlichen Verkehrs, und der daraus fliessenden Regeln für menschlichen Handeln*[3] bleiv meira kend í 1870'unum, tá ið eingilskmaðurin William Stanley Jevons umrøddi bók Gossen við sera rósandi orðum sum eitt týðandi verk innan búskaparligt ástøði. Tað koma vit aftur til seinni í greinini.

[3] Lýsing av lógum um samstarv millum manna og teimum reglum um handil, sum standast av teimum.

## Brúkaraatferð

*Entwickelung* er eitt slóðbrótandi verk í at menna støddfrøðiligar frymlar í búskaparfrøði. Gossen var ikki útbúgvin innan støddfrøði, men hann hevði hegni og evni innan økið, og hann dugdi at lýsa búskaparteori við støddfrøðiligum máli. Sambært Agnari Sandmo er tað mest týðandi íkastið hjá Gossen tað um brúkaraatferð. Í Miðnámsriti nr. 2 í juni 2014 stendur grein um Jules Dupuit, sum í 1844 vísti á fallandi marginalan hug at gjalda fyri at keypa meiri av einari vøru, men Dupuit tók ikki hesa greining inn í eina størri heild at greina brúkaraatferð. Tað skuldi vera Gossen, sum kom við tí. Hann gekk út frá, at hvør einstakur persónur maksimerar eina funktión, sum umboðar eina njótan av at brúka. Gossen hugsaði, at henda funktiónin var summurin av fleiri partsfunktiónum, sum hvør sær umboðaðu njótan av hvørjari vøru. Ein lítil meirnýtsla av einari vøru ger, at njótanin veksur, men hesin vøkstur er minkandi (minkandi positiv marginal nytta). Eftirtíðin hevur kallað hetta Gossens fyrra lóg, og er henda sokallaða lóg grundarlag undir øðrum ástøði um brúkarar (Sandmo 2011).

At maksimera njótan ella nyttu er vanliga treytað av, at brúkarin hevur avmarkað tilfeingi. Í einari versión av ástøði Gossen verður fyrst og fremst hugsað um, at tíðin er avmarkað. Tær vørurnar, sum eru við í nyttufunktiónini, eru tíðin, ið brúkarin brúkar til ymiskt virksemi, og avmarkingin av tilfeinginum er, at tíðin, ið verður brúkt, er tann tíðin, ið er til taks. Gossen vísti matematiskt, at hetta maksimeringsproblemið verður loyst soleiðis, at marginala nyttan av tíð má vera tann sama fyri alt virksemi. Sambært Agnari Sandmo líkist henda orðing av brúkaraprobleminum nýggjari teori innan búskap, sum Gary Becker[4] kom við í 1965. Men Becker vísir ikki til Gossen í hesum sambandi, sum hann kanska ikki visti um, tí bók Gossen var ikki týdd til eingilskt um tað mundið (Sandmo 2011).

Ein veikleiki við ástøði Gossen er sambært Agnari Sandmo, at hon ikki hevur eina búskaparliga avmarking í sambandi við maksimering av nyttu, soleiðis at hon hevði kunnað verið nýtt at kanna, hvussu broytingar í innkomu og prísum ávirka atferðina hjá brúkarum. Hinvegin víðkaði Gossen greiningina til ein myndil, har einstaklingar framleiða vørur og handla tær sínamillum, soleiðis at allir brúkarar kunnu keypa vørur fyri marknaðarprís. Við hesum myndli lýsti hann, hvussu brúkarar býta innkomuna hjá sær, soleiðis at tað 'síðsta atomið av innkomu' gevur somu njótan fyri allar vørur. Hetta ber í sær, at tann marginala nyttan dividerað við prísinum má vera tann sama fyri allar vørur, og er hetta vorðið kent sum Gossens seinna lóg, men av tí at hetta er tað mest originala, ið

[4] Gary Becker fekk Nobel heiðurslønina í búskapi í 1992 fyri íkast til mikrobúskaparliga greining við menniskjaligari atferð og samvirkan.

Gossen kom við, verður hon ofta umrødd sum Gossens lóg. Hetta er framvegis kjarnan í nútíðar ástøði um eftirspurning (Sandmo 2011).

Gossens seinna lóg kann verða lýst við einum einføldum dømi, har vit einans hava tvær vørur. Vi kalla marginalu nyttuna (utility) $u_1$ og $u_2$, og prísirnir eru $p_1$ og $p_2$. Fyri at maksimera nyttuna má lutfallið av marginalu nyttunum vera tað sama sum lutfallið av prísunum: $u_1/u_2 = p_1/p_2$. Henda líkning kann verða umskrivað til $u_1/p_1 = u_2/p_2$, sum er Gossens seinna lóg í hesum føri.

## Hvussu Gossen bleiv viðurkendur

Sum nevnt, vóru tað fá, sum lósu tað, sum Gossen skrivaði í bókini *Entwickelung* frá 1854. Í 1871 kom William S. Jevons við ástøðinum um marginala nyttu í bókini *The Theory of Political Economy*, har hann á sama hátt sum Gossens fyrra lóg lýsir, hvussu marginala nyttan av eini brúksvøru er fallandi. Jevons kemur eisini við einari hugsan, sum minnir um Gossens seinnu lóg, men hon hevur nakrar veikleikar, samanborið við ta originalu útgávuna hjá Gossen, sum ger, at hon ikki er so nýtilig sum teori. Jevons visti einki um Gossen, tá ið hann kom við hesum hugsanum.

Nakað eftir útgávuna í 1871 var tað ein starvsfelagi hjá Jevons við Manchester University, sum gjørdi Jevons varan við Gossen og hansara verk. Jevons, sum trúði, at hann hevði uppfunnið ástøðið um marginala nyttu, var illa við av at síggja, at Gossen hevði longu skrivað um hetta meira skipað og gjøgnumført, enn hann sjálvur hevði. Men sum tann heiðursmaður hann var, skrivaði hann um Gossen í aðru útgávu, sum kom í 1879 (Robbins 1998).

Hetta er ikki eindømi í søguni um búskaparliga hugsan, at tveir persónar koma við somu hugsan og vita ikki av hvørjum øðrum. Eitt annað dømi er um Edward Chamberlin í Amerika og Joan Robinson í Onglandi, sum hvør í sínum lagi og so at siga samstundis í 1933 komu við ástøði um ófullkomna kapping. Tá ið vit spyrja, hví so mundi vera, er eitt svar, at kanska var tíðin búgvin, ella sum Agnar Sandmo tekur til, at 'tað lá líkasum í luftini'. Men so eru tað summi fólk, sum eru framman fyri sína tíð, og sum koma við nýggjum hugsanum, áðrenn tíðin er búgvin, og áðrenn tað liggur í luftini. Gossen var ein av teimum.

# Keldur

Robbins, Lionel (1998), *A History of Economic Thought. The LSE Lectures,* edited by Steven G. Medema and Warren J. Samuels. Princeton: Princeton University Press.

Sandmo, Agnar (2011), *Economics Evolving – A History og Economic Thought*. Princeton: Princeton University Press.